# GERÐABÓK

**Dato:** 24. mai 2018 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin

**Málsnr: 108/18 – 134/18**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Tráin P. Nónklett
Jógvan Arge
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Magnus Dam
Eyðfríið Jacobsen
Eyðna Justinussen
Marius Múller
Jóan Petur Hentze

**LUTTÓKU IKKI:**
Tróndur Sigurðsson

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Barbara Vang

Annika Olsen skjeyt upp at taka málini 114, 117, 122 og 133 av skrá. Hetta varð samtykt uttan atvkøðugreiðslu.

Helena Dam á Neystabø skjeyt upp at taka mál 120 av skrá. Hetta varð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Helena Dam á Neystabø viðmerkti í sambandi við málini, ið vórðu tikin av skrá, at umboðini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum ganga út frá, at avgerðir, ið eru tiknar í teimum málum, ið eru tikin av skrá, verða steðgaðar fyribils.

Annika Olsen váttaði, at hetta verður ført í gerðabókina sum viðmerking til skránna.

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 108/18 | 18/02009-1 | Gunvør Balle: farloyvi frá býráðnum | 344 |
| 109/18 | 18/02010-1 | Turið Horn: farloyvi frá býráðnum | 345 |
| 110/18 | 18/00020-1 | Mál beind í nevndir 2018 | 346 |
| 111/18 | 18/01743-2 | Søla matr. nr. 22z, Við Krossá 8. Kaldbak. | 347 |
| 112/18 | 18/01907-1 | Endurskoðan av samsýningum til kommunustýrislimir | 349 |
| 113/18 | 14/02506-3 | Støðutakan til hvat gerast skal í mun til ognina "Wenceslaus Marius Debes Legat ognin" (Dreygarahúsið) . | 353 |
| 114/18 | 17/03883-2 | Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin) | 355 |
| 115/18 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 363 |
| 116/18 | 16/01125-1 | Tórshavnar Musikkskúli: Nýggjar upptøkureglur | 376 |
| 117/18 | 14/00218-2 | Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan | 379 |
| 118/18 | 16/04312-1 | Skoytubreytin | 388 |
| 119/18 | 14/00772-13 | Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036) | 396 |
| 120/18 | 17/01361-1 | Listaverkstøð í Finsen | 405 |
| 121/18 | 14/01828-52 | Útstykking í Nólsoy - nevndarsamtyktir - broyting av byggisamtykt (2006-1856) | 412 |
| 122/18 | 17/04062-1 | Nýggjar kommunulæknaviðtalur | 424 |
| 123/18 | 14/05065-1 | Miðbýarætlan - Steinatún | 430 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 343<br>Formansins merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 124/18 | 17/03498-2 | Gøtunavn til innkoyringarveg frá Glyvursvegi til “Undir Kongavarða” og “Við Klingrutjørn” | 436 |
| 125/18 | 18/01774-1 | Dagføring av kloakk í Tróndargøtu | 438 |
| 126/18 | 18/01775-1 | Dagføring av kloakk í Bringsnagøtu | 440 |
| 127/18 | 18/01776-1 | Nýggj kloakk í Homrum | 442 |
| 128/18 | 18/01810-1 | Serstøk byggisamtykt Villingadalsvegur matr. 1345a, 1346a og 1347 | 444 |
| 129/18 | 18/01811-1 | Skipan av økinum omanfyri Marknagilsvegin og undir Fjalli | 446 |
| 130/18 | 18/01311-1 | Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu | 449 |
| 131/18 | 18/01941-1 | Nýggj læknamiðstøð í Gundadali | 453 |
| 132/18 | 18/01521-1 | Framflytingar fyri árið 2017 | 456 |
| 133/18 | 18/01522-1 | Eykajáttan 2018 | 459 |
| 134/18 | 18/00018-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018 | 464 |

## ***108/18 Gunvør Balle: farloyvi frá býráðnum***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 108/18 | 18/02009-1 |

**Málslýsing:**
Gunvør Balle hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jógvan Arge, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Samtykt.

| | Býráðsfundur<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 345 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 109/18 Turið Horn: farloyvi frá býráðnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 109/18 | 18/02010-1 |

**Málslýsing:**
Turið Horn hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Tráin Petursson Nónklett, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Samtykt.

## 110/18 Mál beind í nevndir 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 7/18 | 18/00020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 30/18 | 18/00020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 50/18 | 18/00020-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 70/18 | 18/00020-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 110/18 | 18/00020-1 |

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt

# 111/18 Søla matr. nr. 22z, Við Krossá 8. Kaldbak.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 133/18 | 18/01743-2 |
| 2 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 111/18 | 18/01743-2 |

**Upprunin til málið: Útstykking í Kaldbak, frá uml. 2008**

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Sí mál 14/01389 samtykti býráðið 14.12.2017 at lýsa grundstykkini í Kaldbak til sølu til mettan marknaðarprís.

Matr.nr. 22z, sum er til víddar 507m2, varð mett til kr. 208.630,50

Grundstykkini hava staðið á sølulista hjá Meklaranum Betri Heim.
Boð áljóðandi kr. 200.000,00 er innkomið, og onki mótboð. Meklarin hevur fyribils tikið grundstykkið av sølulista og bíðar eftir at kommunan tekur avgerð í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini.** Sí omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Ongir.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongir.

**Skjøl.** Endalig søluváttan frá meklara. Kortskjal. Býráðssamtykt 14/01389

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til, at selja stykkið fyri innkomið boð kr. 200.000,00

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

# 112/18 Endurskoðan av samsýningum til kommunustýrislimir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 136/18 | 18/01907-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 112/18 | 18/01907-1 |

**Upprunin til málið:** Skotið verður upp at gera tvær tørvandi broytingar í kunngerð nr. 93 frá 8. september 2014 um samsýning o.a. til kommunustýrislimir:

1) Umsitingin mælir til, at kunngerðin um samsýning verður bryott soleiðis, at ein generel áseting verður skoytt upp í um at veita kommunustýrislimum eftirlønargjald av teirri samsýning, ið verður fyri arbeiðið sum kommunustýrislimur.

2) Umsitingin mælir til at samsýna borgarstjóra eftir prinsipielt sama leisti sum landsstýrisfólk/løgmaður, eins og gjørt hevur verið inntil 2015.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Viðv. 1) Føroyska samfelagið flytir seg ella lagar seg meira og meira til, at hvør einstakur skal ella væntast at rinda eftirlønargjald av teim samsýningum og lønum, ið viðkomandi hevur.

Hetta sæst á flestu sáttmálaøkjum, har arbeiðsgevarar – umframt lønina – eisini rinda arbeiðstakaranum ávíst eftirlønargjald.

Sambært løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 157 frá 24. desember 2015, skulu allir persónar yvir 21 ár eisini rinda tvungi eftirlønargjald av allari A-inntøku og B-inntøku.

Pensiónsnýskipanin, sum júst er samtykt, byggir í stóran á, at fólk sjálvi hava pensiónsuppsparing.

Tá kommunustýrislimir útinna arbeiðið sum kommunustýrislimir, herundir sum nevndarlimir og nevndarformenn, er hetta ofta við teirri avleiðing, at viðkomandi í ávísan størri ella minni mun má avspáka ella taka sær frí fra borgarliga arbeiðinum. Hetta ávirkar tá lønarinntøkuna og harvið eisini eftirlønargjaldið hjá viðkomandi.

Tað má tí metast rímiligt, um tað, umframt ta samsýning, ið goldin verður fyri kommunupolitiska arbeiðið, eisini verður goldin viðkomandi eitt eftirlønargjald av samsýningini, eins og tað er galdandi fyri borgarstjóran.

Hetta vil vera rímiligt, eisini hóast gjaldið til kommunustýrislimir er orðað sum ein samsýning heldur enn vanlig lønarinntøka, tí gjaldið er eitt lønarlíknandi gjald, ið verður skattað sum a-inntøka, og sum verður latið fyri ávíst arbeiði, útint bæði í vanligari arbeiðstíð og uttanfyri. Gjaldið kemur eisini ístaðin fyri egna lønarinntøku, tá kommunustýrislimir avspáka ella taka frí vegna kommunalpolitiskt arbeiði.

Broytingin viðvíkjandi eftirlønargjaldi kann t.d. verða sum nýggj § 8a, har ásett verður, at fyri allar samsýningar til kommunustýrislimir, nevndarlimir og nevndarformenn – uttan mun til um talan er um fundarpening ella fasta samsýning – kann verða rindað viðkomandi upp til 15% í eftirlønargjaldi.

Av týdningi fyri henda partin av áheitanini er eisini, at síðan kunngerðin um samsýningar var lýst á fyrsta sinni, eru fleiri málsøki løgd til kommunurnar at umsita, t.d. eldraøkið. Hetta økir sjálvsagt um arbeiðbyrðuna og ábyrgdina hjá kommunustýrislimum og hetta talar tí eisini fyri, at eftirløn verður goldin aftrat samsýningini.

Kommunan er av teirri fatan, at heimildin er í kommunustýrislógini til at áseta nærri reglur í kunngerðini um eftirlønargjald til kommunustýrislimir, og tí kann hetta gerst fyrisitingarliga og lógarbroyting er ikki neyðug.

**Viðv. 2)**
Borgarstjórin í Havn hevur áður verið samsýntur eftir sama leisti sum landsstýrisfólk, men síðan 2006 við løn samsvarandi 39. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins, meðan landsstýrisfólk vóru lønt í 38. flokki og løgmaður í 40. flokki. Hetta er broytt eftir seinastu broyting í løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., sum seinast broytt við kunngerð nr. 108 frá 15. September 2015.

Havandi í huga stóru arbeiðsbyrðuna og týðandi ábyrgdina, sum starvið sum borgarstjóri í Tórshavnar kommunu hevur við sær, so metir kommunan tað rímiligt og rætt, um samsýningin til borgarsjóran aftur kemur at fylgja leistinum frá uml. 2006, tvs. at lønin liggur millum hana hjá landsstýrisfólkunum og løgmanni og annars fylgir sama leisti í mun til eftirløn v.m.

Í dag verða landsstýrisfólk lønt við 110 % av lønini eftir 40. flokki, meðan løgmaður fær 130% av í 40. flokki. Skal borgarstjórin í Havn koma á sama støði sum áðrenn landsstýrisfólkalønirnar vóru broyttar, so eigur borgarstjórin hóskandi at kunna samsýnast við 120 % av lønini eftir 40. flokki umframt 15% í eftirløn, heldur enn lívslanga tænastumannaeftirløn eftir gamla leistinum fyri landsstýrisfólk. Talan vildi harvið verið um rímiliga lønarhækking, men mótsatt eisini eina munandi verri ella minni kostnaðarmikla eftirlønarskipan, sum samanlagt eisini er meira gjøgnumskygd fyri kommununa.

Skal broytingin setast í verk, má Fíggjarmálaráðið taka stig til at broyta § 10, stk. 1, nr. 6, í kunngerðini um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini soleiðis, at borgarstjórin kann verða løntur samsvarandi 120% av 40. lønarflokki í tænastumannalógini. Hetta fyri at Tórshavnar kommuna kann fáa heimild til at samtykkja í síni kommunustýrisskipan, at borgarstjórin kann samsýnast við 120% av lønini eftir 40. lønarflokki, og framyvir at fáa 15 % í eftirløn sambært § 13, heldur enn tænastumannaeftirløn og borðfæ eftir serskipan sambært § 16.

Samanumtikið er talan um eina minni-útreiðslu fyri kommununa, um borgarstjórin verður løntur samsvarandi landsstýrisfólki. Sjálv lønin hækkar í mun til galdandi løn, men viðvíkjandi eftirlønargjaldinum, verður talan um eina munandi lægri útreiðslu fyri kommununa, tí borgarstjórar ikki longur vinna fullan eftirlønarrætt til lívslanga tænastumannaeftirløn eftir 8 ára tænastu í borgarstjórastarvinum. Fíggjarmálaráðið hevur roknað út, at lívslanga tænastumannaeftirlønin, ið landsstýrisfólk áður vunnu sær, og sum borgarstjórar framvegis vinna rætt til, hevur eitt virði áljóðandi umleið 110%. Verður skipanin broytt, eins og skotið er upp, lækkar hetta gjaldið niður í 15%.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 71 frá 19. mai 2014 um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin).

Kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

Kommunustýrisskipan fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at taka undir við áheitan á fíggjarmálaráðið um at broyta kunngerðina um samsýning til kommunustýrislimir, soleiðis at eftirlønargjald áljóðandi 15% verður goldið av samsýningum til kommunustýrislimir, og soleiðis at heimilað verður kommununi at samsýna borgarstjóranum eftir sama leisti sum landsstýrisfólk/løgmaður.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, mæla til at málið fyrst verður reist í Føroya Kommunufelag soleiðis, at skipanin verður eins fyri alt landið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Anniku Olsen um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

# 113/18 Støðutakan til hvat gerast skal í mun til ognina "Wenceslaus Marius Debes Legat ognin" (Dreygarahúsið) .

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.09.2014 | 233/14 | 14/02506-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 135/18 | 14/02506-3 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 113/18 | 14/02506-3 |

**Málslýsing:**
Sambært skeyti frá 1989, hevur «Wenceslaus Marius Debes Legat» skeyta ognina matr. nr. 564, Undir Ryggi 8, Tórshavn til Tórshavnar kommunu. Sambært skeytinum hevur Føroya Landsstýrið átalurætt umframt, at tað er ásett við servitutti, at ognin ikki kann seljast og skal nýtast sum «sosial íbúð».
Sambært verkætlanardeidlini er ognin í ringum standi, t.v.s., at tað í dag einki er í húsinum, hvørki veggir, gólv o.l. og sostatt kann ognin í dag ikki nýtast til bústað.
Sambært verkætlanardeidini kostar tað millum 1,1 til 1,5 mió kr. at gera ognina aftur.
Kommunan hevur fyrilagt spurningin fyri Føroya Landsstýrið um loyvi at sleppa at selja ognina, um býráðið skuldi vilja tikið ta avgerð.
Landstýrið hevur vent aftur til tk við hesum spurningum:

- Hvussu nógvan pening hevur tk brúkt uppá ognina síðani yvirtøkuna í 1989 ?
- Hvørjum standi er ognin í í dag ?
- Hevur tk umhugsað at brúka ognina til annað almannagagnligt endamál, enn bústað?
- Hevur tk umhugsað at geva onkrum almannagagnligum felagsskapi ognina ?

Til fyrsta spurning, er smb. Verkætlanardeidlini búktar kr. 1.104.072 frá 1996 til 2014.
Til spurning 2 er støðan sum omanafyrinevnt, at húsið er tómt innan – t.v.s. einki gólv, veggir – og sostatt ikki búgvandi í.
Áðrenn landsstýrið tekur støðu til, hvørt tey vilja loyva býráðnum at t.d. selja, ella broyta nýtslu av ognini, má býráðið svara spurningum, hvørt býráðið er sinnað antin at brúka ognina til annað almannagagnligt endamál ella vil lata ognina til annan almannagagnligan felagsskap.
Orsøkirnar til seinastu tveir spurningarnar frá landinum eru væntandi settir, tí um landið møguliga ikki er sinnað at loyva sølu, vil landið møguliga loyva aðrari nýtslu av ognini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla fíggjarnevndini til at taka støðu til, hvørt kommunan skal halda fram at arbeiða við ætlanum um at fáa loyvi frá landinum at selja ognina. Umframt taka støðu til, hvørt fíggjarnevndin metir, at ognin kann nýtast til annað almannagagligt endamál, ella latast almannagagnligum felagsskapi.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Samtykt at halda fram at arbeiða við ætlanum um fáa loyvi frá landinum at selja ognina umframt at fáa loyvi til at nýta ognina til annað almannagagligt endamál ella lata almannagagnligum felagsskapi ognina.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samskift við Føroya Landsstýrið síðan 2014 um møguleikan annaðhvørt at selja ognina ella nýta hana til annað almannagagnligt endamál.

Av tí at ein borgari vendi sær til landsstýrið um at leiga ognina, vísandi til ásetingar um framíhjárætt vegna skyldskap í uppruna legatinum, mátti landsstýrið fyrst kanna, hvørt framíhjárættur hjá ávísum næstringum framvegis var galdandi. Tað bleiv í februar í ár staðfest, at eingin hevur framíhjárætt til ognina, eftir at hon viðurlagsfrítt varð latin Tórshavnar kommunu í 1989, skjal nr. 18 í hesum máli.

Landsstýrið hevur ikki viljað loyvt kommununi at avhenda ognina í fríari sølu. Tó vildi landsstýrið loyva kommununi at avhenda ognina viðurlagsfrítt, um kommunan fann eitt almannagagnligt endamál, ið landsstýrið kundi góðkenna.

Umsitingin tók síðani upp samráðingar við Bústaðir, um tey høvdu áhuga í at yvirtaka ognina við teirri treyt, at hon skal nýtast sum "sosial íbúð", og tað er Bústaðir sinnað til. Landsstýrið tók 16. apríl 2018 avgerð um, at Tórshavnar kommuna kann avhenda ognina til Bústaðir við somu tinglýstum treytum, ið settar vórðu kommununi í 1989, nevniliga at ognin skal nýtast sum "sosial íbúð", og at ognin ikki má seljast, uttan við loyvi frá Føroya Landsstýri. Landsstýrið grundar m.a. sína avgerð á, at *" Tað týdningarmiklasta er, at ognin verður nýtt til tað endamál, sum er tinglisið á ognina, og sum var ásett í Wenceslaus Marius Debes Legat. Tað er ikki so týdningarmikið, hvør er eigarin av ognini, so leingi hon tænir sínum ásetta endamáli."*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggarnevndina at avhenda ognina til Bústaðir uttan viðurlag við treytum um, at ognin skal nýtast sum "sosial íbúð" og ikki má seljast.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Atvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, tveimum blonkum og ongar ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Tráin P. Nónklett, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus og Helena Dam á Neystabø

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen.

# 114/18 Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 308/17 | 17/03883-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 3/18 | 17/03883-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 58/18 | 17/03883-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.02.2018 | 70/18 | 17/03883-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 90/18 | 17/03883-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 129/18 | 17/03883-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 150/18 | 17/03883-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 130/18 | 17/03883-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 82/18 | 17/03883-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 167/18 | 17/03883-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 139/18 | 17/03883-2 |
| 12 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 114/18 | 17/03883-2 |
| 13 Býráðsfundur | | | 17/03883-2 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot frá skúlastjóranum í Skúlanum á Fløtum um, hvussu høli í skúlanum kunnu skipast.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í oktober var dialogfundur millum leiðsluna í Skúlanum á Fløtum og umboð fyri mentamáladeildina. Eitt evni á fundinum var hølisviðurskiftini. Skúlin á Fløtum húsast í hesum seks eindum: í Kongagøtu (garðinum hjá Frk. Cohr), í Fríðrik Petersens gøtu, við Landavegin, á Frælsinum/Handan Á, á Argjavegi og í Gundadali.

Frá februar 2018 fer ein stova at vanta í í Gundadali, tí skúlin skal úr gamla húsinum hjá Fótbóltssambandinum. Í gamla húsinum er ein 8. flokkur, tað er ikki pláss fyri honum í hølunum, sum verða leigað í bygninginum hjá Fótbóltssambandinum.

Næmingatalið í komandi 9. 8. og 6. árgangi. er ov høgt. Hesir árgangir hava verið fýra spor, tá skúlarnir vórðu lagdir saman og so koma tvey spor aftrat úr Sankta Frans skúla, sostatt er neyðugt við hølum til ávikavist fýra og seks flokkar í hesum árgangum.

Tað er tørvur á einum høli á uml. 20 m$^2$ í veghædd til Litir í Leiki, tí tað riggar ikki so væl, at frítíðarskúli og Litir í Leiki hava tað eina fyribilshølið í Kongagøtu í felag, tí har eru stór og dýr ljóðføri inni.

Sum er, er skúlin á nógvum matriklum, so tað er ikki ein loysn at finna høli aðrastaðni enn, har skúlin er framman undan. Skúlin hevur víst á møguleikan at fáa Realskúlan aftur, nú Heilsuhúsið flytur haðani.

Skúlastjórin hevur sent uppskot um eina loysn. Sambært hesum uppskoti, fær Skúlin á Fløtum Realskúlan, og hann verður so brúktur til 3. flokk, og soleiðis verður øll grunddeildin savnað í Kongagøtu. Í hesum bygningi er eisini pláss fyri virkseminum hjá Litum í Leiki, sum nú er í tí eina fyribilshølinum í garðinum hjá frk. Cohr. Um forskúli verður stovnaður skúlaárið 2019/2020 hevði kanska borið til, at hann var í Realskúlanum saman við fyrsta flokki. Men ivasamt er, um tað er nóg gott pláss til tríggjar flokkar aftrat í bygninginum.

Um bert ein árgangur verður í Realskúlanum, so er pláss til annað virksemi eisini t.d. býarsavn.

Um skúlin fær ein part av Realskúlanum, soleiðis at pláss er fyri einum árgangi og Litum í Leiki har, so ber til at flyta úr Gundadali og siga leigumálið upp. Sambært leigusáttmálanum kann leigumálið tó í fyrsta lagi sigast upp til 01.04.2019.

Skúlin metir ikki, at tað er so umráðandi, at fótbóltsflokkarnir hava høli í Gundadali, tí tað er gott  busssamband og lætt at koma aftur og fram í sambandi við undirvísing og venjing á vøllunum í Gundadali.

Útreiðslurnar til leigu fyri hølini í Gundadali eru 24.540 kr. um mánaðin. Um tað ber til at siga leigumálið upp til juli 2018, so kann skúlin byrja at flyta, tá skrivligu próvtøkurnar eru síðst í mai og flyta útgerð og innbúgv úr hølunum. Skíggjar og talvur verða so settar upp í Kongagøtu, og neyðugt er ikki við nýíløgu til útgerð og innbúgv.

Skúlin og frítíðarskúlin hava skrivstovu í Móttøkuhúsinim, og heilsufrøðingurin hevur eisini høli har. Um skúlin fær høli í Realskúlanum, ber væntandi til at flyta úr Móttøkuhúsinum. Skrivstovurnar kunnu kanska vera á loftinum og heilsufrøðingurin í somu hølum, sum hann var í, tá skúlin var í Realskúlanum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

Foreldraumboðini í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum taka undir við uppskotinum hjá skúlaleiðsluni, at Skúlin á Fløtum fær Realskúlan at ráða yvir, og umboðini heita í teldubrævið dagfest 11. desember 2017 á Tórshavnar kommunu at bera so bandi, at tað ber til at savna grunddeildina í miðbýnum.

Í teldubrævinum frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum stendur m.a. “Tað sum vit meta vera serliga átrokandi í hesum uppskoti er, at skúlin fær hølini í Realskúlanum saman við bygningunum í Kongagøtu at ráða yvir.
Vit meta, at tað er neyðugt at savna alla innskúlingina og tilboðini, ið eru tengd at henni, á einum stað.
Her hugsa vit um frítíðarskúlan, ein møguligan komandi forskúla, Litir í Leiki og at 1.-3.fl. ið natúrliga hoyra saman, eru staðsettir saman.”

Umsitingin metir ikki, at Realskúlin er egnaður til ein árgang á tríggjar flokkar umframt forskúla og mælir tí frá at skipa forskúla har.

3. flokkur skúlaárið 2018/2019 var í eindini á Frælsinum í fyrsta flokki, er fluttur í eindina Kongagøtu hetta skúlaárið og skal so flyta aftur næsta skúlaár, um skúlin ikki fær høli í Realskúlanum. Um so verður, verður skúlin á somu matriklum um nú, og 3. flokkur fer so væntandi í eindina í Fríðrik Petersensgøtu.

Uttan mun til hvat annað virksemi verður í Realskúlanum er umráðandi, at Litir í Leiki fær eitt høli í bygninginum, og hølið má vera í veghædd.

Tá 8. F skal úr gamla FSF húsinum í vár, flytur hann í eindina á Frælsinum. Tað er ikki besta loysnin, tí har verður hann saman við miðdeildini, tað sum er eftir av hesum skúlaárinum.

Um Skúlin á Fløtum fær Realskúlan, eru tveir møguleikar. Annar er at siga leigumálið við Fótbóltssambandið upp, og hin er, at skúlin fer úr eindin í Fríðrik Petersensgøtu, sum so kann brúkast til okkurt annað virksemi. Verður leigumálið sagt upp, so verða skúlaárið 2018/2019 fýra flokkar í eindini í Fríðrik Petersensgøtu. Tað verða ítróttaflokkarnir, sum verða tveir 8. flokkar og tveir 9. flokkar. Hinir flokkarnir í hesum árgangum verða antin í eindini á Frælsinum ella í eindini á Argjavegi. Skúlin hevur ikki tikið endaliga støðu til tað enn.

Til tess at fremja hesa ætlan, er neyðugt við ávísum tillagingum í bygninginum. Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03897 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða ætlanina við skúla í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Síðan seinasta fund er komin teldupostur frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum við áheitan at lata Skúlan á Fløtum hava økið við Kongagøtu og Realskúlan í tvey ár afturat. Teldupostur dagfestur 24. januar 2018 við áheitanini er hjálagdur.

Umsitingin vísir til mál um bráðfeingis plásstørv á dagstovnøkinum j.nr. 17/03897, har avgjørt er, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leik hjá Skúlanum á Fløtum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata nevndini skrivið til kunningar.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Útsett.

**Mentamálanevndin 08. februar 2018:** Samtykt at heita á umsitingina at kanna møguleikan fyri at hýsa 3. flokki í Skúlanum á Fløtum í umhvørvinum við Kongagøtu og Finsen.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur kannað møguleikan at finna onnur høli í nánd av Skúlanum í Kongagøtu, soleiðis at øll grunddeildin í Skúlanum á Fløtum kann verða á einum stað.

Hølini í kjallaranum í Finsen út móti Tórsgøtu, sum eru ætlað til café, eru ikki tikin í nýtslu enn. (Tekning er hjáløgd). Har eru nøkur arbeiði, sum ikki eru liðug, t.d. ljós, el-stikk, radiatorar, partur av gólvinum og okkurt er eftir at mála. Samskifti er við Bústaðir um, at hesi arbeiðið verða gjørd. Haraftrat verður neyðugt at gera skilaveggir í café-økinum – ein við dupulthurð, ið býtir høli í tvey og ein út móti gongini. Hølini til undirvísing mugu lúka vanlig krøv til ljóðviðurskifti.

Um møguligt verður at leiga hesi høli til Skúlan á Fløtum, er neyðugt, at skúlin eisini fær høli 1.01 í Realskúlanum til undirvísing.

Ætlanin er, at tveir flokkar verða í Finsen og ein í Realskúlanum, og at Litir í Leiki kunnu so haraftrat brúka 1.01, tá flokkurin ikki brúkar tað hølið, og haraftrat gomlu sangstovuna í Finsen.

Í kjallaranum í Finsen verða tvey flokshøli (café-økið verður býtt sundur til tvey flokshøli), og gongin verður brúkt til felagsøki. Høvuðsinngongdin verður í tunlinum undir Auluni í Finsen, og hølið, sum er avmerkt til starvsfólk verður brúkt til bólka- og samrøðurúm. Hølið sum er avmerkt til inngongd til sunnaru stovuna.

Hølini mugu vera klár til undirvísing 15. august í 2018. Innbúgv og kt-útbúnaður skal bíleggjast. Veitingartíðin er uml. tríggjar mánaðir og uppsetingin eini tvær vikur, sostatt er neyðugt, at hølini eru klár 1. august.

Skúlin útvegar innbúgv og talvur til hølini í Realskúlanum og talvur til hølini í Finsen. Tórshavnar kommuna útvegar innbúgv, amboð og gardinur til flokshølini í Finsen, innbúgv til karnapparnar, mottir og gaderobu við inngongdina. Kostnaðarmetingin fyri hetta er 300.000 kr.

Leigan fyri kjallaran í Finsen verður ætlandi greið innan medio mars. Ætlandi skal møguliga leigumálið byrja 1. juli 2018.

Á fundinum verður greitt frá tilgongdini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Tekstur kemur týsdagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Bústaðir bjóðar kommununi at leiga høli í Finsen til Skúlan á Fløtum. Leigumálið er fyri tvey ár. Leigukostnaður er ikki endaliga ásettur.

Litir í Leiki heldur í løtuni til í sangstovuni í Finsen, og tí er undirvísingin hjá Musikkskúlanum í kontrabassi eisini flutt úr fyribilshølunum í garðinum hjá Frk. Cohr og í sangstovuna í Finsen.

Um skúlin fær høli í Finsen og eitt høli í Realskúlanum, so øll grunddeildin verður savnað í umhvørvinum við Kongagøtu, eru tríggir møguleikar lýstir niðanfyri, um hvussu skúlin kann skipa grunddeildina.

*a. Fyrsti flokkur í Finsen*
Skúlaárið 2018/2019 eru 46 næmingar skrivaðir inn í fyrsta flokk í Skúlan á Fløtum, og er tað bert grundarlag fyri tveimum flokkum. Sostatt ber til, at fyrsti árgangur verður í hølunum í Finsen, og hinir báðir árgangirnir í grunddeildini verða verandi í Kongagøtu. Skúlin á Fløtum fær so eingi høli í Realskúlanum, og Litir í Leiki heldur fram í sangstovuni.

Vansin við hesi loysn er, at hon forðar fyri møguleikanum at stovna ein flokk aftrat í Skúlanum á Fløtum, um so skuldi verið, at næmingatalið veksur, og Mentamálaráðið játtar kommununi at stovna ein flokk aftrat í hesum árgangi.

Ein annar vansi er, at klædnagoymslan hjá frítíðarskúlanum er í Kongagøtu.

Aftrat hesum kemur, at skúlin hevur roknað við at kunna brúka starvsfólkarúmið í Kongagøtu til starvsfólk burtur av og ikki til serundirvísing, fundir o.a. Tí við hølunum í Finsen og í Realskúlanum var møguleiki at brúka tað eina undirvísingarhølið til serundirvísing, bólkarúm, fundir o.a.

Í Finsen er eitt rúm í lonini út móti Sjúrðargøtu, sum kann verða brúkt til serundirvísing. Vansin við tí er, at børnini skulu út fyri at koma til hølið. Tað er tó beint tvørtur um garðin, so úr skúlastovunum í Finsen er talan bert um at fara tvørtur um garðin, men úr bygninginum í Kongagøtu er nakra longri, og talan er jú um ta yngstu deildina í skúlanum.

*b. Triði flokkur í Finsen og Realskúlanum*
Næmingatalið 2018/2019 í triðja árgangi er 61, og talan er sostatt um tríggjar flokkar.

Fyrimunir eru, at 3. árgangur verður i Finsen og í 1.01 í Realskúlanum, tí hann er tann elsti árgangurin, kennir umhvørvið væl, megnar best at flyta seg í umráðnum, fara til felagstiltøk í bygninginum í Kongaøtu og fara oman í útiøkið hjá skúlanum og Grasagarð, hóast tað er eitt sindur longri at fara enn úr bygninginum í Kongagøtu.

Her ber eisini væl til at gera royndina, at tann eini flokkurin, Litir í Leiki-næmingarnir, verða í Realskúlanum í eini stovu við vanligum innbúgvi, sum skúlin tekur við úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu. Møguleikin er so at gera royndir við øðrvísi innbúgvi í Finsen og brúka royndirnar frá tí, tá innbúgv verður keypt til nýggja bygningin úti á Fløtum.

Um 3. árgangur verður í Finsen og Realskúlanum, verður eitt flokshøli tøkt í Kongagøtu, sum so kann verða brúkt til serundirvísing, bólkarúm, fundarhøli o.a. Hesi høli mangla í eindini í Kongagøtu.

Vansarnir við hesi loysn eru, at 3. árgangur ikki er savnaður í sama bygningi, og at tann eini flokkurin heldur til í hølum í einum bygningi, sum ein dagstovnur er í. Tað er ivasamt, um tað er sambæriligt, at skúli og dagstovnur húsast í sama bygningi og so tætt hvørjum øðrum.

*c. Triði flokkur í Finsen*
Tað ber til at savna 3. árgang, um skúlin umframt hølini við caféøkið fær hølið í Finsen á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta til flokshøli. So verða allir tríggir flokkarnir í hesum árgangi á sama stað, og loysnin við hesum hølum gevur møguleika fyri betri samanhangi, tí hølini eru í sama bygningi, á somu hædd og inngongdin er úr sama tunli.

Við hesi loysn verður eisini tað eina hølið í Kongagøtu tøkt, og tað ber til at skipa serundirvísingsøkið har og bøta munandi um starvsfólkaviðurskiftini, soleiðis at starvsfólkarúmið verður starvsfólkarúm burtur av.

Henda loysnin ávirkar hølisviðurskiftini hjá Listgrafiska verkstaðnum, sum ætlanin var skuldi halda til í Finsen í hølinum á horninum móti Tórsgøtu/Sjúrðargøtu. Her er tó annar møguleiki, har Listgrafiska verkstaðið fær onnur høli í ovaru fimleikahøllini og tilhoyrandi hjáhølum í Finsen, sum ætlaði eru til myndlistaverkstøð (sí mál 17/01361).

*Annað*
Uttan mun til hvør loysnin verður, er neyðugt, at Litir í Leiki framhaldandi kann nýta sangstovuni í Finsen, til skúlin flytur á sumri 2020.

Tað verður ikki neyðugt at játta eyka til útreiðslur til el og hita til hølini í Finsen, tí skúlin hevur játtan til eindina í Fríðriks Petersensgøtu, og tær útreiðslurnar hevur skúlin ikki, tá hann flytur úr bygninginum.

Skúlin tekur ikki undir við loysn a: at fyrsti flokkur er í Finsen. Við hesi loysn missir skúlin munandi meir enn hann fær, sostatt gevur tað ikki meining at flyta úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu, og skúlin vil so heldur halda fast við bygningin í Fríðriks Petersensgøtu. Tað

triðja undirvísingarhølið er ein treyt, sum skúlin heldur fast við. Haraftrat metir skúlin, at tað er rættast, at fyrsti og annar árgangur eru í Kongagøtu, tí teir árgangirnar ganga í frítíðarskúla, og frítíðarskúlin brúkar eisini hølini í Kongagøtu.

Skúlin tekur heldur ikki undir við loysn b: at triði árgangur er í Finsen og í hølinum 1.01 í Realskúlanum, tí skúlin metir, at avbjóðingarnar við, at skúli og dagstovnur eru í sama bygningi, og hølini eru síð um síð, eru ov stórar.

Skúlin tekur undir við loysn c: at 3. árgangur fær caféøkið og hølið á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta í Finsen.

Skúlin leggur dent á, at hølisviðurskiftini hjá starvsfólkunum í Kongagøtu eru ikki í lagi, tí serundirvísing, starvsfólkarúm og fundarhøli eru í sama høli, eitt høli sum er 20 $m^2$ . Nú bert tveir 1. flokkar verða í Skúlanum á Fløtum, ber til at bøta um hesi viðurskifti við at skipa alt serøkið í eindini í Kongagøtu í einum flokshøli í Kongagøtu.

Samanumtikið tekur skúlin hvørki undir við loysn a ella b, skúlin tekur undir við loysn c., og um tað ikki ber til at fáa triðja flokshøli í Finsen, ynskir skúlin at verða verandi í Fríðriks Petersensgøtu.

Við loysn c. verður bygningurin í Fr. Petersensgøtu 9 tøkur til annað endamál.

Um avgjørt verður at fremja ætlanina at savna triðja árgang í Finsen, verður tørvur á fígging til ymiskt innbúgv o.a., umframt til leigukostna til Bústaðir fyri hølini. Leigukostnaðurin verður væntandi tøkur til fundin mánadagin. Til ein komandi fund kemur tilmæli um, hvussu útreiðslurnar kunnu fíggjast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at savna triðja árgang í Finsen og at farið verður undir endaligar samráðingar við Bústaðir um avtalu í Finsen um leigu og ávísa innrætting av hølunum í caféøkinum og at leggja málið fyri aftur til komandi fund.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Samráðingar hava verið við Bústaðir um innrætting og leigu, hølini talan er um eru 250 $m^2$. Uppskot er, at leigan verður 925 fyri $m^2$, hetta íroknað útreiðslurnar, ið Bústaðir hevur at innrætta hølini til skúlabrúks. Hølini í Finsen verða klár í august 2018. Innrættingarætlanin er góðkend av byggivaldinum.

Kostnaðarmeting til innbúgv skúlastovur, karnappar, garderobu, næmingaskáp, skáp til goymslu, gardinur og mottur er 300.000 kr. Ætlanin er, at hetta innbúgvið verður brúkt aftur í bygningin úti á Fløtum, tá skúlin flytur út hagar í 2020. Ætlanin er at keypa tvey ymisk sløg av stólum til næmingar umframt nøkur einkultborð, nøkur dupultborð og nøkur bólkaborð, so alt

innbúgvið ikki er sama slag. Hetta gevur møguleika at innrætta stovurnar ymiskt, og at laga innbúgvið til ymsan tørv og ymiskt virksemi.

Av tí, at innbúgvið tvs. borð, stólar, skáp verður brúkt aftur í Skúlanum á Fløtum, verður mælt til at játta 300.000 kr. av játtanini til verkætlanina av 4176 Nýbygging skúlar (L41012).

Útreiðslurnar til leigu í 2018 eru 96.350 kr., tær verða býttar millum 4117 Skúlin á Fløtum og 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Í fíggjarætlan 2019 verður so lagt upp fyri, soleiðis at útreiðslurnar til leigu eru á játtanini hjá Skúlanum í Fløtum, og skúlin fær kompensatión fyri tann partin av leiguni, sum skúlin hevur goldið frá august til desember 2018.

Uppskot til leigusáttmála verður tøkt mánadagin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja

a) At gera leigusáttmála við Bústaðir um hølini í Finsen til skúlabrúks
b) At játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum

og beina punkt a) í fíggjarnevndina og punkt b) í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir, sum eykajáttan.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, mæla til at finna eina loysn fyri Listagrafiska verkstaðið, áðrenn støða verður tikin til hetta mál.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

# 115/18 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |
| 38 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 120/17 | 14/03408-18 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.04.2017 | 89/17 | 14/03408-18 |
| 40 Fíggjarnevndin | 26.04.2017 | 103/17 | 14/03408-18 |
| 41 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 158/18 | 14/03408-18 |
| 42 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 140/18 | 14/03408-18 |
| 43 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 115/18 | 14/03408-18 |

**Málslýsing:**

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3

mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m² |
| | | |
| Tilsamans | | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

| | |
|---|---|
| P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum | - 287.151.814 kr. |
| P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum<br>(eisini nevnt: Samtakið í Havn) | - 298.955.524 kr. |
| P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum | - 267.809.320 kr. |

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Partalagsavtala varð undirskrivað 17. november 2016. Síðani hava partarnir arbeitt við at gjøgnumganga og menna verkætlanina sbrt. ætlanini í partalagsavtaluni, herundir at fáa sent myndugleikaprojekt til góðkenning hjá byggivaldinum. Hetta var gjørt fyrst í apríl og er endaligt svar væntandi um stutta tíð.

Eisini er arbeitt við at fáa ásett endaliga byggikostnaðin. Í tilgongdini eru fleiri tilagingar gjørdar við atliti til at náa ein nøktandi targetkostna samsvarandi upprunaligu ætlanini, sí hjálagt skjal. Eisini sæst at, í tilgongdini eru nakrar postitiónir, sum av misgáum ikki vóru við í upprunaliga útboðstilfarinum/nøgdarlistunum, og sum nú eru roknaðar við.

Targetprísurin er nú ásettur til kr. 247.000.000 við avhending í einum byggistigi 1. apríl 2020, tó so, at møguliga vilja partar av verkætlanini kunna verða liðug áðrenn, men er ov tíðiliga at áseta tað enn. Arbeiðið kann byrja at kalla beinanvegin. Verandi arbeiðstøka við planering er um at vera liðug.

Nú er klárt at taka støðu til um farast skal víðari í partalagsfasu 2 og gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála.

Kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m. umframt mvg) er nú kr. 383.073.750.

Higartil eru játtaðar kr. 101.752.000 til verkætlanina, harav kr. 42.075.000 er standa í løgukarmi 4176 Nýbygging skúlar fyri fíggjarárið 2017, og aðrar kr. 37.809.000 standa sum minninýtsla fyri 2016 og tí skulu framflytast í sambandi við ársroknskapin hjá kommununi.

Írestandi fíggjartørvur avrundað er sostatt kr. 281.323.000, ið skulu játtast yvir fíggjarárini 2018, 2019 og 2020. Mett verður, at fíggjartørvurin fyri inniverandi ár er kr. 61.015.000, tvs., at í inniverandi fíggjarárið er kr. 18.869.000 sett ov nógv av, og kann løgukarmurin tí lækkast fyri inniverandi fíggjarár.

Samlaði fíggjartørvurin fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður sambært hesum tí kr. 300.192.000. býtt soleiðis samsvarandi væntaðum útreiðslutørvi fyri hesi ár: í 2018 kr. 110.175.000, í 2019 kr. 127.383.000, og í 2020 kr. 62.634.000.

Hjáløgd málinum er:
a) frágreiðing um fyriliggjandi forprojekt til góðkenningar
b) uppskot til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Samtakið Articon-Búsetur Í/F
c) kostnaðaryvirlit

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna hjálagda forprojekt og høvuðsarbeiðstøkusáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, har samlaði kostnaðarkarmurin fyri byggingina er kr. 383.073.750.

Til tess mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta fyri fíggjarárið 2017 kr. 23.206.000 á løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar út á løgukontu L41012 Skúlin á Fløtum, og flyta minninýtslu á somu løgukontu fyri fíggjarárið 2016 kr. 37.809.000, og at írestandi upphæddin kr. 300.192.000 fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður játtað samsvarandi býtinum omanfyri, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti**:
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2018 eru játtaðar 100 mio.kr til verkætlanina. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á á leið 91 mio. kr til arbeiðstakarar og ráðgevar. Hartil koma ymiskar útreiðslur hjá byggiharranum. Samstundis er við 1 viðgerð samtykt í býráðnum framflytning av minnunýtsluni í 2017 á 6.541 tkr. (sí mál 18/01521 – Framflytingar fyri árið 2017). Mett verður hóskandi at hava eitt ávíst fíggjarligt rásarúm fyri um verkætlanin kemur at vinna inn á settu tíðarætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 92 mio. kr. av løgukarminum 4176 á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt**.**

# 116/18 Tórshavnar Musikkskúli: Nýggjar upptøkureglur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 71/16 | 16/01125-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 105/16 | 16/01125-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 128/16 | 16/01125-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 104/16 | 16/01125-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 174/18 | 16/01125-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 138/18 | 16/01125-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 116/18 | 16/01125-1 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar Musikkskúli (TM) og Mentamáladeildin/Trivnaðarfyrisitingin arbeiða við at endurskoðað ymisk viðurskifti hjá skúlanum. Sí eisini mál 15/01950 Mál og avrikssáttmáli 2016 fyri Tórshavnar Musikkskúla.

Gjørt er uppskot til nýggjar upptøkureglur vm. fyri TM – sí hjálagt. Uppskotið er gjørt og viðgjørt í einari breiðari tilgongd á skúlanum, í Musikkskúlanevndini og við umsitingina í kommununi. Ætlanin er, at nýggju reglurnar koma í gildi 1. apríl 2016, og at samstundis verður gjørd ein kunningarætlan, ið skal tryggja at verandi næmingar, og tey á bíðilista fáa góðan møguleika fyri at gera seg kunnugan við broyttu reglurnar, og hvussu mannagongdirnar eru.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja hjálagda uppskot til upptøkureglur vm. fyri Tórshavnar Musikkskúla.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting at tilmeldingargjaldið verður kr. 2.000,00 íroknað møguligt ljóðføri v.m. Heitt verður á fyrisitingina at konsekvensbroyta uppskotið til reglur og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Gjøld
Raksturin hjá TM hevur ikki verið í javnvág í fleiri ár. Átøk eru gjørd, men ikki nøktandi til at

fáa javnvág í aftur. Fyri at fáa vent støðuni endaliga er avrátt fylgjandi meginátøk í 2018, ið serliga fáa ávirkan á 2019 og framyvir.

1. Spara eitt til hálvtannað starv (uml. 25 tímar). – gevur umleið 300 tkr. netto.
2. Útreiðslurnar til umvæling av ljóðførum lækkað við uml. 100 tkr.
3. Hækkað næmingagjaldi, uppskot er frá 2.000 kr. upp í 2.250 kr. Væntandi gevur hetta eina meirinntøku á umleið 100 tkr.

Tískil er neyðugt at fáa stilla verandi næmingagjald. Mæla til at hækka tað 250 kr./árið fyri vanliga undirvísing.

Gjaldið var seinast broytt í 2016 og eru fylgjandi gjøld hjá skúlanum:
---

Gjaldið fyri eitt skúlaár er kr. 2000,- her íroknað leigu av ljóðføri.

Um fleiri systkin ganga í skúlanum, rindar fyrsta barnið fult tilmeldingargjald og onnur systkin einans 50 % av tilmeldingar gjaldinum, tó bert tá gingið verður til einstaklinga undirvísing og ikki fyri systkin, ið eru 18 ár og eldri.

Árligi kostnaður fyri klaverspælistovu og musikalska spælistovu er kr. 500 (vikuskeiðstilboð)
Árligi kostnaðurin fyri barna- og ungdómskór er kr. 500.kr.
Árligi kostnaðurin fyri Musikkskúla Miðnám og PO - er kr. 2.400.kr.(Upptøkuroynd krevst)
Árligi kostnaðurin fyri undanskeið er kr. 800.kr. (til teirra ið fyrireika seg til Musikkskúla Miðnám ella PO)
Árligi kostnaðurin fyri Litir í Leiki er kr. 5.000.kr.(skipanin er í samstarvi við Skúlan á Fløtum).

Mett verður eisini hóskandi at stilla nøkur onnur av gjøldunum t.e. Barna- og ungdómskór til 1000.kr., umframt spælistovu til 600.kr. og undanskeið til miðnám til 1000.kr. Skúlaárið 2018/19 væntast at vera umleið 122 kórnæmingar, 5 næmingar til undanskeið, meðan ikki nøkur meting enn viðv. spælistovu. Samanlagt geva hesar broytingarnar umleið 60 tkr. netto í meirinntøku.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at hækka:
a. Næmingagjaldið til 2250 kr.
b. Barna- og ungdómskór til 1000 kr
c. Spælistovu til 600 kr.
d. Undanskeið til miðnám til 1000 kr.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Tráin Nónklett at beina málið aftur í Mentamálanevndina, ið fall við 5 atkvøðum fyri, 6 ímóti og 1 blonk.

Fyri atkvøddu: Tráin P. Nónklett, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

Móti atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 4 ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Tráin P. Nónklett, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 117/18 Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 132/16 | 14/00218-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 210/16 | 14/00218-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 280/16 | 14/00218-2 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 237/16 | 14/00218-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 243/16 | 14/00218-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 296/16 | 14/00218-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 33/17 | 14/00218-2 |
| 8 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 72/17 | 14/00218-2 |
| 9 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 113/17 | 14/00218-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 220/17 | 14/00218-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 231/17 | 14/00218-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 141/18 | 14/00218-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 199/18 | 14/00218-2 |
| 14 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 117/18 | 14/00218-2 |

**Málslýsing:**

**Mál nr. 14/00218 – Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan**

Á kontu 5475 Býarbókasavnið (íløgur) fyri 2016 eru játtaðar 3.000 tkr.

Í 2014 varð fyrireikingararbeiði gjørt viðvíkjandi út- og umbygging av Býarbókasavninum (BBS). Sí hjálagt skjal 1 og skjal 2 við uppskoti til verkætlan, ið Sp/f Árni Winther Arkitektar stóðu fyri. Sí eisini hjáløgdu ársfrágreiðing og mál- og avriksavtalu hjá BBS – skjal 3 og 4.

**Ætlan og kostnaðarmeting**
Heildarætlanin varð tá mett til 37 mió. kr. íroknað innbúgv v.m. Umsitingin og BBS meta, at uppskotið sum heild er gott og kann vera grundarlagið fyri víðari viðgerð.

**Stuðul frá landinum sbrt. § 15, stk. 2 og 3 í bókasavnslógini**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið viðvíkjandi stuðli. Lógin ásetur, at landið veitir upp til 50% í studningi til bygging, um- ella uppíbygging. Neyðugt er, at landsstýrismaðurin í mentamálum góðkennir verkætlanina eftir tilmæli frá Landsbókasavninum og sum skilst eisini Landsverki. Við atliti til at fáa greiði á fíggingini er neyðugt sum skjótast at fáa sent prinsipiella umsókn til Mentamálaráðið og Landsbókasavnið, soleiðis at landið kann fyrireika játtan til endamálið í 2017-2019/20. Um støði verður tikið í § 15, stk. 3, er býtið millum kommununa og landið umleið 18,5 mió. kr. í part, og um landið rindar yvir 4 ár, so umleið 4,6 mió. kr. um árið árini 2017-2020. Við fyrivarni fyri at landið góðkennir allar útreiðslurnar!

**Bygging í stigum og aðrar fyritreytir**
Av tí at BBS framhaldandi skal virka so ótarnað sum gjørligt og við atliti til, at umbyggingin órógvar starvsfólk og viðskiftafólk sum minst, er ætlanin at fremja verkætlanina í stigum. Ein týðandi fyritreyt fyri tí er, at greiði verður á, um og nær KT-deildin og fíggjardeildin flyta úr bygninginum, tí tað vil geva betri pláss til umbyggingina.

Byggistigini eru hugsað at kunna verða framd soleiðis:

| Ár/ stig | Ætlan | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **2016/17** | • Kjallari innrættast og takast í nýtslu sum opin goymsla (Bøkur flytast av goymslu á 4. hædd + Eysturskúlanum til kjallaran).<br>• Byrja at umvæla tekju, útveggir og takpall sambært ætlan.<br>• Starvsfólk flyta niður á 2. hædd út móti Sverrisgøtu/Káta Horni, har fyribils skrivstovukjarna kann vera, meðan arbeiðið fer fram.<br>• Núverandi skrivstovuhølir kunnu takast upp í útlánið á 2. hædd og geva rúm fyri bókum frá Sverrisgøtu.<br>• Byrja at umvæla og innrætta 4. hædd til barna- og ungdómsdeild. | *Lyfta og trappuuppgongd skulu umvælast eisini.*<br><br>*Kunnu bøkur úr útláninum evt flytast niður á 1. hædd, meðan arbeiðið fer fram?* |
| **2017/18** | • Framhaldandi umvæling og innrætting av 4. hædd (+ evt hølini hjá Fíggjardeild).<br>• Tá 4. hædd er liðug, ber til at flyta alt virksemið frá Barnabókasavninum av 3. hædd upp á 4. hædd.<br>• Byrja at umvæla 3. hædd sambært ætlan (+ KT-deild).<br>• | *Kjallari, 1. hædd, partur av 2. hædd og 3. hædd fullvirkin, meðan arbeiðið fer fram.* |
| **2018/19** | • Framhaldandi umvæling av 3. hædd.<br>• Tá 3. hædd er liðugt umvæld, ber til at flyta útlánið av 2. hædd upp á 3. hædd.<br>• Umvæling og innrætting av 2. hædd. + 1 nýggja lyftu og trappuuppgongd. | *4. hædd tikin í nýtslu sum barna- og ungdómsdeild, skert ella einki virksemi í útláninum á 2. hædd.*<br><br>*Skrivstovukjarna út móti Sverrisgøtu má flytast, meðan arbeiðið fer fram. Hvar? Evt. partur av 3. hædd.* |
| **2019/20** | • Umvæling og innrætting av restini av kjallara.<br>• 1. hædd liðugt umvælast og innrættast.<br>• **1. apríl 2019 fyllir BBS 50 ár.** | |

**Yvirskipað um Býarbókasavnið**
Býarbókasavnið hevur seinastu árini verið í positivari menning. Bókasavnið er ein av mest vitjaðu mentanarstovnunum í kommununi og er eisini størsta fólkabókasavn í landinum. Seinasta brúkarakanning vísir, at 65% av borgarunum í kommununi hava seinasta árið verið á gátt.[1] Hetta er væl meir enn í grannalondum okkara, har miðaltalið liggur um 50%. Eisini síggja vit ein risa vøkstur av vitjandi seinastu 5-6 árini, har talið er vaksið frá 80.000 vitjandi til

[1] Kanningin varð gjørd 15.03.16. Kanningina gjørdi spyr.fo v/Allani Dalsgarð.

at tátta í tey 140.000 í 2015. Hetta er ein vøkstur uppá 16% í 2015. Nøgdsemið er stórt millum brúkararnar, og starvsfólkið støðast og trívist væl á arbeiðsplássinum.

Positiva gongdin er ikki uttan orsøk. Hon er neyvt tengd at eini miðvísari menning av bókasavninum sum ein meiri sjónligur og atkomiligur viðspælari í miðbýarøkinum, eitt alsamt meiri nútímansgjørt bókasavn við betri og fleiri tilboðum og tænastum á høgum stigi.

Gongdin kann í stuttum lýsast soleiðis:

Í 2009 keypti Tórshavnar kommuna bygningin á Niels Finsensgøtu 7.[2] Samstundis varð eisini farið undir at endurnýggja og nútímansgera niðastu hædd. Í 2012 stóð veghæddin klár at taka í nýtslu. Í 2012/2013 fekk bókasavnið nýggja leiðslu, har størri dentur varð lagdur á ein meiri málrættaðan bókasavnsprofil. Millum annað fór man burtur frá “ad hoc”- leiðsluhátti til ein meiri stategiskan leiðsluhátt. Bygnaðarbroytingar vórðu framdar. Farið varð burtur frá tí flata bygnaðinum, og í staðin varð farið yvir til ein bygnað við fleiri ábyrgdarøkjum, sum eisini arbeiða uppá tvørs í toymum. Í 2014 varð eisini varaleiðari settur. Í 2015 varð avgreiðslusamskipari settur. Í 2015 fær Tórshavnar kommuna nýggjan mentamálaleiðara, har samstarvið og dialogurin millum stovn og kommunufyristing verður styrktur. Millum annað verður ein mál- og avrikssáttmáli gjørdur og undirskrivaður, har sett verður út í kortið, hvørji mál og avrik bókasavnið næsta árið skal seta sær fyri at fremja og miða ímóti.

Eitt av fremstu málum og eisini størsta avbjóðingin fyri áhaldandi menning og trivnaði á bókasavninum eru hølisviðurskiftini, sum í verandi líki forða fyri áhaldandi menning.

**Framtíðarkósin**
Umframt lógarásettu karmarnar, sum ásetur bókasøvnum at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi, so hava nútímans fólkabókasøvn fingið ein broyttan leiklut í mun til áður. Bókasøvn eru ikki longur friðarligar bókagoymslur, men eru vorðin livandi og dynamisk støð, sum laga seg eftir økta og broytta bókasavnstørvinum í nútíðarsamfelagnum. Eitt stað, sum spælir ein aktivan leiklut í lokaløkinum, sum tað í størri mun enn áður er við til at revitalisera og menna. Fyrilestrar, kjak, rúm fyri læring og fordjúpilsi og nógv onnur tiltøk, sum ikki einans snúgva seg um bókaútlán, knýta seg at modernaðum bókasavnsvirksemi.

Hendan gongd hevur eisini merkt virksemið á Býarbóksavninum seinastu árini. Í dag er Býarbókasavnið eitt meiri opið og sjónligt stað, sum eftir førimuni markerar seg úteftir við reglulígum tiltøkum, við at vera sjónligt í miðlunum, við eini aktivari heimasíðu og við luttøku í sosialu miðlunum. 1. januar 2015 økti bókasavnið munandi um upplatingartíðirnar. Í dag hevur bókasavnið sostatt opið hvønn dag – eisini sunnudag og gerandisdagar til seint út á kvøldið. Nógv fleiri fólk leita sær á bókasavnið og brúka tænasturnar á staðnum uttan neyðturviliga at fara avstað aftur við eini bók undir arminum.

Hetta setur onnur krøv til hølisviðurskiftini, sum komast skal nærri inná niðanfyri.

**Býarbókasavnið, verandi viðurskifti**
Í mong ár hava hølisviðurskiftini á Býarbókasavninum ikki verið nøktandi til virksemið tess. Bygningurin er 50 ára gamal, og lítið er gjørt við hann hesa tíðina. Umframt at hølini eru niðurslitin, hevur bókasavnið eisini verið plágað av lekum og blámusoppi, til ampa fyri starvs- og viðskiftafólk. Plásstrot er, bæði til bøkur, viðskiftafólk og starvsfólk.

---

[2] Bókasavnið hevur, síðani tað læt upp í 1969, leigað í alsamt størri pørtum av bygninginum.

Bókasavnið eigur umleið 75.000 bøkur o.a. tilfar. Umleið 6.000 bøkur standa á eksternari goymslu vegna plásstrot.

**Bókasavnið m$^2$:**
4. hædd 170 m$^2$ - av hesum: 14 m$^2$ skrivstovur - 40 m$^2$ bókagoymsla
3. hædd 257 m$^2$ - av hesum: 49 m$^2$ skrivstovur (38 m$^2$ avbyrgt øki vegna leka) - 15 m$^2$ bókagoymsla
2. hædd 466 m$^2$ - av hesum: 43 m$^2$ skrivstovur - 14 m$^2$ bókagoymsla
1. hædd 268 m$^2$ - av hesum: 100 m$^2$ lesistova
0. hædd uml. 20 m$^2$.
Tils. 1.161 m$^2$ - av hesum: 106 m$^2$ skrivstovur - 69 m$^2$ bókagoymsla - 100 m$^2$ lesistova

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Niðasta hæddin hevur staðið óvirkin, men í skrivandi løtu er partur av kjallaranum væl á veg til at verða innrættaður til eina opna goymslu. Restin av kjallaranum er goymsluhøli hjá kommunalu húsaumsitingini og kaféini. Undir trappunum í kjallaranum finst avísgoymsla, umframt goymsla av ljóðútgerð.

**1. hædd / veghæddin**
Nýumvæld 2009-2011.
Høvuðsinngongd, kafé, avís- og tíðarritsdeild, avgreiðsla, sjálvavgreiðsla (afturbering og avheinting av bókum v.m.), internetteldur, framsýningarhøli, vesir. Lyfta finst á 1. hædd, sum gongur upp til 4. hædd.

**2. hædd**
Útlánið, ungdómsdeild, skrivstovur, kopirúm, teldurúm, goymslurúm.

**3. hædd**
Barnabókasavnið, barnavesir, lítil inngongd, trappuppgongd við lyftu, skrivstovuhøli (harav er innara hølið avbyrgt vegna lekar og blámusopp), lítið goymslurúm.

**4. hædd**
Skrivstova hjá býarbókavørði, fundarhøli (fyrrverandi íbúð v/ køki, baðirúmi, gongd), lítil køkur, bókagoymsla, gongd, vesi, goymsla til vaskiútgerð og annað. Ein óbrúktur takpallur.

**Komandi hølisviðurskifti**
Verandi hølir, og standurin á teimum, avmarka sum er virksemið. Umvæld og dagførd hølisviðurskifti fara at bera í sær eitt fjølbroyttari og betri nútímansbókasavn.

Við støði í ynskjum og í samsvari við mál og visjón Býarbókasavnsins gjørdi Sp/f Árni Winther Arkitektar eitt skitsuuppskotslíknandi uppskot í 2014. Uppskotið hevur verið væl móttikið av bæði leiðslu og starvsfólki á Býarbókasavninum, eins væl og umsitingini. Uppskotið gongur eisini teimum ynskjum og treytum á møti, sum eru neyðugar til eitt vælvirkandi bókasavn. Millum annað er hædd tikin fyri broytta bókasavnsleiklutinum við m.a.

- betri lesi- og lestrarumstøðum, sum stuðla upp undir reflektión og djúphugsan
- fundar- og aktivitetsrúm, sum er multifuntionelt og fleksibult
- størri rúmd til børn og ung, eins væl og rørslutarnað
- betri goymsluviðurskifti til bøkur v.m.
- tiltaks- og fyrilestrarhøli, ið kunnu hýsa fleiri tiltøkum
- skrivstovur í eini samlaðari kjarnu, sum stuðlar upp undir arbeiðsgongdirnar

Í stuttum áttu verandi hølisviðurskifti at sæð soleiðis út:

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Bókagoymsla og fyrilestra-/tiltakssalur. Kann eisini nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**1. hædd / veghæddin**
Í stóran mun óbroytt, burtursæð frá rúmligari lyftu og nýggjari trappuuppgongd frá kjallara.

**2. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Lesistova, lesiklivar, samrøðu- og serrúm. Starvsfólkaskrivstovur og fundarhøli kring ein felags kjarna. Lesiklivar kunnu nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**3. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Rúm fyri bókaframsýningum, teldum, kopiering, lesi- og sitiplássum.

**4. hædd**
Barna- og ungdómsdeild. Hølini kunnu deilast upp í eindir og skulu sostatt kunna hýsa fjølbroytta virkseminum á barna- og ungdómsbókasavninum, t.e. stovnsvitjanum, mammubólkum, barnafamiljum, lektiukafe, teldu- og miðlasavn, multirúm til spøl, rørslu, tiltøk og framførslur. Í tilknýti til hetta skal takpallurin eisini takast í nýtslu.
Í uppskotinum er roknað við, at hølini út móti Sverrisgøtu, har Fíggjardeildin og KT-deildin í dag halda til, verða tikin við upp í Býarbókasavnið.

**Býarbókasavnið og miðbýurin – nakrir tankar**
Seinastu árini hevur rákið verið, at bókasøvn verða hugsað inn í og brúkt sum ein týðandi liður í strategiskari býarplanlegging. Bókasavnið er ofta kjarna og miðdepil í at endurmenna og skapa lív í býarrúminum.
Býarbókasavnið liggur í hjartanum í Havnini. Verandi gomlu bygningar seta sínar avmarkingar, men veita eisini serligar møguleikar til at skapa eitt vælvirkandi og innbjóðandi býarumhvørvi. Í gørðum og smogum aftanfyri kunnu skapast nøkur nýggj og spennandi býarrúm.

Við gongugøtuni beint uttanfyri, men eisini við møguligum inngongdum/ gjøgnumgongdum umvegis Vaglið, Tórsgøtu og Sverrisgøtu, eru eisini nakrir serligir møguleikar at skapa eitt meiri livandi býarrúm og at aktivera hesi økir, sum í løtuni ikki verða brúkt. Eitt nú kundu smogur og bakgarðar verið brúktir sum sambindingarlið millum aðrar mentanarstovnar í miðbýnum: Perluna, Reinsaríið, Margarinfabrikkina, Tjóðpallin og Vaglið.

Til ber at hugsa sær, at mørkini millum bókasavn og býarrúm gjørdust meiri flótandi, at man t.d. samantvinnar innara bókasavnið við ytra býarrúmið, eitt nú við partvíst yvirdekkaðum smogum, bakgørðum, sum kunnu nýtast; ikki bert til at ganga ígjøgnum, men eisini til annað uttanduravirksemi. Sostatt kundi bókasavnið verið við til at skapa eina synergi millum ymsu stovnarnar í miðbýnum, sum kann styrkja um býin sum læringar-, mentanar- og upplivingarrúm.

**Býarbókasavnið sum høvuðs- ella meginbókasavn – nakrir ávegis tankar**
Tosað hevur verið leysliga um, at Býarbókasavnið møguliga í framtíðini kundi blivið eitt høvuðs- ella meginbókasavn fyri allar Føroyar. Í dag er hetta ein deild undir Føroya Landsbókasavni, nevnd Bókastovan, sum er ásett í Bókasavnslógini Kapittul VIII, § 21 og 22.

Stutt um høvuðsbókasavnsvirksemið:

- at samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til skúla- og fólkabókasøvn.
- at skráseta, binda inn og greiða hetta tilfarið til bókasøvnini
- at fremja upplýsandi tiltøk um bókasavnstilfar.
- at skipa fyri eftirútbúgving og skeiðsvirksemi fyri starsvfólki á bókasøvnunum.
- at skipa fyri býti av bókasavnsgjaldinum (t.e gjald til føroyskar rithøvundar og týðarar, hvørs bøkur eru til taks á bókasøvnunum).

Til hetta virksemi krevjast hølir og starvsfólk.

Í skrivandi løtu er málið ógvuliga hypotetiskt, og tískil ber illa til at koma við ítøkiligum tonkum og viðmerkingum. Fyrst og fremst krevst ein broyting í verandi bókasavnslóg.
Í øllum førum ber til at staðfesta, at um so var, at Býarbókasavnið skuldi fingið eina slíka funktión afturat, hevði ein ný- og umbygging brynjað bókasavnið enn betur til at taka ímóti hesi avbjóðing. Umbyggingin skal vera framskygd og stuðla undir eina langtíðarætlan fyri Býarbókasavnið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til fyriliggjandi prinsippuppskot við atliti til, at umsókn kann í mai/juni verða latin Mentamálaráðnum og Landsbókasavninum um fígging sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini árini 2017-2020. Samstundis fer umsitingin til fundin í oktober at fyrireika neyvari ráðlegging av verkætlan og tíðarætlan við atliti til at kunna fremja verkætlanina í stigum, herundir gerð av fasadum komandi vetur.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Í juni lat umsitingin umsókn til Landsbókasavnið og Mentamálaráðið sum samtykt á fundi í mentamálanevndini 4. mai 2016. Í skrivi frá Landsbókasavninum hevur umsitingin fingið at vita at Landsbókasavnið hevur latið tilmæli til Mentamálaráðið. Biðið er um partsinnlit í tilmæli, men er svar ikki komið enn.

Í samskifti við teknisku fyrisiting, ið virkar sum byggiharri í byggiverkætlanum hjá Tórshavnar

kommunu er avgjørt at tað hevði verið ein fyrimunur fyri víðari tilgongdina at ein samlað byggiskrá fyrilág, ið nakað neyvari enn verandi tilfar nágreinar hølistørv og skrá og í hvønn mun annað virksemi við fyrimuni kann hugsast at verða hýst saman við Býarbókasavninum.

Hóskandi er at seta eina verkætlanrnevnd við umboðum fyri trivnaðarfyrisiting, teknisku fyrisiting og Býarbókasavnið. Nevndin skal verða liðug við sítt arbeiðið innan 1. november 2016.

Ein fyritreyt fyri at umbyggingin og heildarætlanin fyri Býarbókasavnið kann fremjast er at KT-deildin og Fíggjardeildin hjá Tórshavnar kommunu flytir úr bókasavnsbygninginum á Káta Horninum. Ein ætlan fyriliggur at innrætta 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 til at hýsa hesum báðum deildunum. Verkætlanin er mett til kr. 1.262.194, men fígging er ikki tøk.

Á løgukarminum fyri 2016 eru játtaðar kr. 3.000.000 til Býarbókasavnið. Uppskot er tí, at játtan til innrætting hjá miðfyrisitingini í Niels Finsensgøtu 17 verður fingin til vega av játtanini til Býarbókasavnið treytað av, at Býarbókasavnið kann flyta inn í hølini á Káta Horninum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
a) at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá, og .
b) at flyta kr. 1.262.194 av løgukarminum fyri 2016 ætlað Býarbókasavninum til kontu 6109 Húsaumsitingin, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin kemur á fundinum at geva status viðv. umsóknini til mentamálaráðið vm.

**Mentamálanevndin 2. november 2016:** Kunnað varð um status.

**Ískoyti:**
Tilboðini uppá umbygging av 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 eru 736.000 kr. hægri enn upprunaliga mett. Áðrenn arbeiði kann byrja, skal neyðug játtan vera tøk.

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og trivnaðarstjórin mæla til at játta 736.000 kr. til umbyggingina á konto 6109 umsiting og røkt av bygningum. Fíggja av kontum við avlop í 2016. 200 tkr. Av 1311 Miðfyrisiting, 436 tkr. av 5310 Mentanartiltøk og 100 tkr. av Vinnutiltøk.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Síðani samtyktina hjá mentamálanevndini 4. mai 2016 og umsóknina sbrt. § 15, stk. 3, ið var latin mentamálaráðnum í juni 2016, hevur umsitingin regluliga spurt um málið hjá Mentamálaráðnum (MMR) og eitt tíðarskeið í ár Løgmansskrivstovuna (málsøkið var í uml. 2 mánaðir har) eftir svari uppá umsóknina.

7. september 2017 kemur soljóðandi fráboðan frá MMR:

"Viðvíkjandi umvæling/umbygging av Býarbókaaavninum í Havn.

Til endamálið er sett av á løgujáttanini árini framyvir, soleiðis:

2018: 1.5 mió. kr.
2019: 3.5 mió kr.
2020: 3.5 mió kr.

Hetta er tað, ið arbeitt verður við, sum landsins partur av útreiðslunum.

Endaliga verður hetta ikki samtykt fyrr enn løgtingsfíggjarlógin fyri 2018 er samtykt."

Nærri greiningar vera annars ikki givnar.

Tað er at fegnast um at MMR kemur við slíkari tilsøgn, tó at henda upphædd er ikki er heilt í samsvar við tað upphædd søkt er um sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini. Umsóknin til MMR var á uml. 17,5. mio.kr. yvir 4 ár.

Byggiskráin fyri verkætlanin er enn í gerð og hevur lutvíst verið bíðað eftir at fáa betri greiði á, hvat fíggjarligt útgangsstøði verður fyri verkætlanina. Ætlandi verður byggiskráin liðug í november og klár til nevndarviðgerð tá.

Ein fyritreyt fyri verkætlanini er at KT-deildin og Fíggjardeildin flyta úr bókasavnsbygninginum. Tann verkætlanini er í gongd og verður ætlandi liðug um fáar vikur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða fráboðanina frá MMR við atliti til at umsitingin kemur við nærri tilráðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka við tilsøgnini frá MMR, men samstundis taka upp samskiftið við MMR um møguliga játtan árini 2021 og frameftir, soleiðis at komið verður uppá fullu upphæddina søkt er um.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**

Í 2016 varð samtykt ein heildarætlan fyri umbyggingina av býarbókasavninum. Í einum ískoyti frá 2017 er skrivað, at ein fyritreyt fyri ætlanini er, at KT-deildin og Fíggjardeildin flyta út av 3. og 4. hædd á Káta Horninum. KT-deildin og Fíggjardeildin eru nú flutt úr hølunum, men fyrisitingin hevur brúk fyri at hava skrivstovur á 4. hædd.
Deils er ætlanin at siga upp leigumálið í Niels Finsens gøtu 31, sum er hølini, ið húsa umsitingini hjá Heilsu- og Umsorganarstænastuni, soleiðis at fyrisitingin kann flyta tættari uppat restini av fyrisitingini í kommununi. Hetta hevur við sær eina sparing í leiguútreiðslum uppá kr. 265.200 um árið.

Harumframt skal pláss gerast til ein stjóra aftuat í ráðhúsinum, og hetta merkir, at staðsetingar av fólki í pørtum av fyrisitingini mugu umskipast.

**Tilmæli:** Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at samtykkja, at heildarætlanini fyri umbyggingina av Býarbókasavninum ikki fevnir um 4. hædd á Káta Horninum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá**.**

# 118/18 Skoytubreytin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 394/16 | 16/04312-1 |
| 2 Býráðsfundur | 16.11.2016 | 292/16 | 16/04312-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 305/16 | 16/04312-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 68/17 | 16/04312-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 187/17 | 16/04312-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 168/17 | 16/04312-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 28.09.2017 | 227/17 | 16/04312-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 217/17 | 16/04312-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 212/17 | 16/04312-1 |
| 10 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 245/17 | 16/04312-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 216/17 | 16/04312-1 |
| 12 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 271/17 | 16/04312-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 27/18 | 16/04312-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 95/18 | 16/04312-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 121/18 | 16/04312-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 97/18 | 16/04312-1 |
| 17 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 80/18 | 16/04312-1 |
| 18 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 118/18 | 16/04312-1 |
| 19 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 16/04312-1 |

**Málslýsing:**
Skoytubreytin var fyrstu ferð sett upp í 2011 og hevur síðani verið opin uml. 2 mánaðir á hvørjum ári kring ársskiftið. Ymiskt er, hvussu tað hevur hilnast við rakstrinum, men sum heild góð undirtøka.

Á kontu 5716 Skoytubreyt er ikki tøk fígging til at breytin letur upp hetta tíðarskeiðið.

Útgreining viðv. tørvi á eykajáttan í sambandi við uppseting, rakstur og niðurtøku av skoytubreyt – desember 2016 til og við januar 2017.

Farna tíðarskeið var dagligi raksturin útveittur til privatan veitara. Harumframt eru ymiskar útreiðslur í sambandi við flutning, tilfar vm. Hallarumsitingin (Ítróttaanlegg) hevur ábyrgd av anlegginum. Inntøkurnar frá skoytubreytini fara til kontuna.

Leysliga mett er talan um fylgjandi útreiðslur og inntøkur:

Rakstraravtala, uppseting o.a. kr. 270.000 fyri tíðarskeiðið.

Ravmagnsútreiðslur mettar til uml. kr. 120-160.000 fyri tíðarskeiðið.
Atgongumerkjainntøkur mettar til uml. kr. 120-160.000 fyri tíðarskeiðið.

Samlaður fíggjartørvur fyri tíðarskeiðið umleið kr. 270.000 um óvissa viðvíkjandi inntøkum og ravmagni umleið kr. 30.000. Í alt kr. 300.000.

Ikki er endaliga avrátt viðvíkjandi staðseting.

Standurin og tøknin á verandi skoytubreyt er um at vera ótíðarhóskandi, men verður mett at hon kann roynast einaferð enn.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at játta á kontu 5716 Skoytubreyt kr. 300.000 fyri 2016 at fíggja av kontu 20910 Aðrar inntøkur.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 16. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Skoytubreytin er í ringum standi (bæði kølianlegg og slangur), og verður ikki mett ráðiligt at halda fram við verandi anleggi. Mett verður, at hon eigur at verða burturbeind nú, tí goymsluplássið á Hjalla kostar Ítróttaranleggum einar 65 tkr. um árið.

Um ynski er framhaldandi at hava eina skoytubreyt, ber til at velja millum eina líknandi tøkni við nýggjum og betri kølianleggi ella eina sonevnda íslíkisbreyt (kunstísbreyt). Ein breyt á 20 m x 30 m (uml. 600 $m^2$) og annað tilhoyr, kostar leysliga mett (ref. prísir) uml. 1.000 tkr. Niðanfyri er leinkja til íslíkisbreyt https://drive.google.com/file/d/0B44uDuymJfBeeTEtRmdiVWx5Y0E/view

Peningur er ikki settur av til endamálið, og má um so er raðfestast í 2017 ella seinni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at Ítróttaanlegg kann burturbeina gomlu skoytibreytina.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Ynski er sett fram at fáa eina skoytubreyt aftur í býin til komandi vetur. Í hesum sambandi eru tveir høvuðsspurningar at greiða.

Tann fyrri er ein møgulig staðseting, ið eisini ger av, hvussu stór breytin kann vera. Farnu tvey árini hevur hon staðið á Vaglinum, og áðrenn tað nøkur ár í garðinum við Finsen (fyrrv. kommunuskúlagarðurin) og á Skálatrøð. Fylgjandi møguleikar eru hugsandi til komandi staðseting.

- Vaglið
- Skálatrøð

- Í Gundadali við Gundadalshøllina (tó har er ein avbjóðing viðv. plássi og atkomu í sambandi við komandi útbygging av Tórsvølli)
- Í Gundadali á parkeringsøkinum við Ovara vøll

Á flestu av hesum støðunum vilja vera ávísar ella størri avbjóðingar. Harumframt er spurningur, hvat umhvørvi breytin skal vera partur av. Farnu árini hevur breytin vanliga verið opin í desember og januar á hvørjum vetri.

Annar spurningurin er kostnaðurin. Fyribils metingar eru, at ein vanlig breyt við ektaðum ísi, umframt ymiska útgerð vil kosta umleið 1.000 tkr. og somuleiðis ein íslíkisbreyt. Fremsti fyrimunurin við íslíkisbreyt er, at hon ikki brúkar streym, men kannað eigur at verða, hvussu ein slík roynist ella upplivist um so er, at ynskið er at útvega eina slíka.

Umframt løgukostna er eisini neyðugt við ávísari nettojáttan til raksturin, tí higartil hava gjøldini ikki dekkað allan raksturin og uppseting, tó so, at helst ber til at hækka gjøldini nakað uttan at tað vil ávirka eftirspurningin hjá brúkarunum stórvegis.

Skal nýggj breyt verða tøk at taka í nýtslu síðst í november, skal berast skjótt at.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at taka støðu til, um nýggj skoytubreyt skal fáast til vega, og um so er, at taka støðu til fíggingina av hesum
b) at umrøða møguliga staðsetingar og beina tann spurningin til byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við at fáa til vega nýggja skoytibreyt, at staðseta hana í miðbýnum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Tað eru avmarkaðir møguleikar í miðbýnum í mun til staðseting til skoytubreyt og stødd.

Í sambandi við framtíðar býarplanlegging av býnum, kundi skoytubreytin verið hugsað inn sum ein liður í eini langtíðarloysn, t.d. sum ein partur av torginum í Vágsbotni ella á Skálatrøð, tá Tjóðleikhúsið gerst aktuelt. Staðsetingin á Vaglinum seinnu árini hevur eisini verið væl móttikin av brúkarum.

Niðanfyristandandi uppskot leggja upp til skoytubreytir, ið lættliga kunnu setast upp og takast niður aftur. Staðsetingar kunnu roynast, so funnið verður fram til bestu langtíðarloysnina at staðseta eina skoytubreyt, antin um talan er um eina loysn í miðbýnum ella í sambandi við eina møguliga multihøll.

Í sambandi við spurningin um møguliga staðseting av skoytubreytini, er býarskipanardeildin komin fram til tríggjar møguleikar, umframt at víst verður á nøkur alternativ, sí kortskjal journal nr. 16/04312-7:

**Vágsbotnur**
Torgið í Vágsbotni er ein liður í miðbýarætlanini, og tað er væl hugsandi, at ein skoytubreyt kann gerast ein støðug (vetrar)loysn í sambandi við eina dagføring av verandi skipan á økinum. Økið liggur í hjartanum í miðbýnum og við trappuni sum áskoðarpláss og kaffistovunum út eftir bryggjukantinum er hetta ein eyðsæð staðseting í mun til býarplanleggingina og býarlívið. Pláss er fyri eini skoytubreyt áleið 400 $m^2$, og kundi

staðsetingin verið roynd sum ein fyribils verkætlan í sambandi við dagføringina av verandi skipan á økinum.

**Vaglið**
Her hevur skoytubreytin staðið áður, og hevur tað riggað væl, hóast hendinga mótmæli er komið um at handlar missa viðskiftafólk. Pláss er fyri eini skoytubreyt áleið 400 $m^2$.

**Við Bókhandilin**
Triðja uppskotið er at staðseta eina skoytubreyt millum Tinghúsvøllin og Bókhandilin. Henda loysnin er ikki roynd áður, men økið liggur eisini í hjartanum í miðbýnum og kann virka fyri, at skoytubreytin gerst sjónlig í býarmyndini og tískil virkar dragandi fyri fólk til gongu. Pláss er fyri eini skoytuberyt áleið 250-350 $m^2$.

Harafturat ber til at vísa á nakrar alternativar staðsetingar:
- **Skálatrøð,** óavmarkað stødd. Uml. 400 $m^2$
- **Frúutrøð,** økið liggur ikki í miðbýnum, men eitt uppskot til staðseting, har breytin helst kann standa longri enn á Vaglinum, um tørvur er á tí, uml. 500 $m^2$
- **á Glasheyggi,** ikki mitt í býnum, men eitt uppskot til staðseting, har breytin helst kann standa longri enn á Vaglinum, um tørvur er á tí, uml. 400 $m^2$

Í øllum uppskotunum omanfyri skulu atlit takast til ferðslu og parkering.

Viðmerkjast skal, at øll uppskotini á kortskjalinum eru vegleiðandi og kunnu tillagast økið.

**Skjøl:**
Uppskot um staðseting til skoytubreyt 16/04312-7

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja staðsetingina í Vágsbotni ella at vísa á eina av útvaldu staðsetingunum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at fáa staðsetingina í Vágsbotni betur lýsta, at leggja fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti.**
Gjørdar eru ávísar forkanningar viðv. møguleikum fyri keypi og leigu av eini skoytubreyt við ísi. Ymiskar tekniskar loysnir eru møguligar. Eitt nú við gummislangum ella alurørum í sjálvari ísskoytubreytini, umframt kølikompressara. Aðra útgerð til breytina eigur Ítróttaanlegg longu frá undanfarnu skoytubreyt. Veljast kann eisini at keypa bandar, ið eru gjørdir til endamálið ella brúka ta sjálvgjørdu loysnina, ið Ítróttaanlegg hevur gjørt og brúkt higartil. Ávís sparing er í tí.

Vegna knappa tíð verður mett frægast at leiga eina skoytubreyt (stødd umleið 20 m x 25 m) og kunnu so fyrireikingar verða gjørdar til at fyrireika keyp av eini skoytubreyt til sesongina 2018/19. Til ber bæði til at keypa eina nýggja breyt og brúktar.

Fyri leigu av eini breyt, umframt flutning, tilgerð av lendinum undir breytini og uppseting v.m. verður mett neyðugt við eini játtan á uml. 600 tkr. Roynt verður at fáa til vega tvey tilboð uppá leigu av skoytubreyt.

Keyp er eisini møguligt og krevur tá eina játtan á tils. umleið 2 mio.kr.

Fígging er sum er ikki tøk á konto 5716 Skoytubreytin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at leiga eina ísskoytubreyt til sesongina 2017/18 og í hesum sambandi játta kr. 600.000 til kontu 5716 skoytubreyt.

Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til játta kr. 600.000 av kontu 20910 aðrar inntøkur til kontu 5716 skoytubreyt

**Mentamálanevndin 28. september 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, mæla til at skoytubreytin heldur verður keypt enn leiga og at finna eina endaliga staðseting til eina framtíðar skoytubreyt í miðbýnum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum i mentamálanevndini og vísir á, at leigan av skoytubreyt ikki er boðin út.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at taka undir við minnilutanum í mentamálanevndini 28. september 2017, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

Ímóti atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu:
Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein og Gunvør Balle

Ímóti atkvøddu: Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Eftir at umsitingin hevur kannað Vágsbotn sum uppskot til staðseting av skoytubreyt, eru fleiri upplýsingar at taka atlit til.

Umboð frá teknisku deild og vegadeildini halda sum nú er ikki, at Vágsbotnur er ein egnað staðseting til skoytubreyt í ár, hetta eisini orsakað av stuttum skotbrái til skoytubreytin skal setast upp.

Víst verður á, at hæddarmunurin frá lægsta punkti við Kallkyn til hægsta punkt við Mylnugøtu er 75 cm. Ein uppfylling fyri at fáa alt økið uppá 380 $m^2$ vatnrætt kemur at krevja uml. 250 $m^3$ av fyllu ella svarandi til 20 billess.

Tilfarið verður lánt frá goymsluni hjá Tórshavnar kommunu við Oyggjarvegin, síðani lessað/koyrt oman til Vágsbotn og planerað út og trumlað. Tá breytin skal takast niður aftur, verður tilfarið grivið uppaftur og koyrt á goymsluna aftur. Vegadeildin metir, at hetta kemur at kosta umleið kr. 50.000. Afturat hesum arbeiði skulu kantar byggjast kring økið, sum heldur fylluna.

Afturat omanfyri nevndu avbjóðingum við Vágsbotni sum uppskot til skoytubreyt kunnu nevnast:
- Avbjóðingar kunnu standast av, at vegabrunnurin, sum tekur tað mesta av yvirflatuvatni í økinum, fer í fylluna.
- Tvær ljósmastrar skulu flytast ella takast burtur.
- Ferðslan skal umleggjast.
- Nólsoyar Páll kemur at standa við ísi upp til knøini.
- Streymveitingin á økinum er í løtuni ikki nøktandi til eina skoytubreyt, sum krevur 160 KW.

Umsitingin metir tí, at besta loysnin til at staðseta skoytubreytina hendan veturin er á Vaglinum. Parkeringsplássini verða rættaði upp við skervi, soleiðis at breytin verður vatnrætt.

Samstundis kann umsitingin arbeiða víðari við at staðseta skoytubreytina í Vágsbotni næsta vetur sum eina fyribils ella varandi loysn. Hetta kann gerast í sambandi við miðbýarætlanina, sum endurskoðar Vágsbotn bæði við atliti til torgið, ferðslu og skipan av økinum sum heild.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tekniska deild og vegadeildin hava verið inni yvir málið og viðgjørt staðsetingina í Vágsbotni í mun til streym, ferðslu og onnur viðkomandi viðurskifti.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna staðsetingina á Vaglinum, har hon áður hevur verið staðsett, at umsitingin arbeiðir víðari við verkætlanini at staðseta eina skoytubreyt í Vágsbotni í sambandi við miðbýarætlanina og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Reglugerð fyri skoytubreytina

Fyri greiðari og betri kundatænastu á skoytubreytini hevur umsitingin saman við Ítróttaanleggum gjørt uppskot til reglugerð fyri brúk av skoytubreytini. Sí hjálagt uppskot. Ætlanin er at fáa eftirmett tilboðið og reglugerðina tá henda sesongin er farin.

Skoytubreyt sesongina 2018/19

Av tí at leiga ella keyp tekur tíð at fyrireika er ynskiligt stundisliga at fara undir tilgongdina um hvør loysn skal brúkast komandi sesong og um staðseting av breytini. Umsitingin vil á fundinum greiða nærri frá kostnaðarmetingin fyri á.v.v. keyp og leigu av eini skoytubreyt og onnur rakstrarviðurskifti og fígging.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at samtykkja uppskotið til reglugerð fyri skoytubreytina
b). at umrøða frágreiðingina um møguliga skoytubreyt fyri komandi sesong við atliti til at umsitingin kemur við tilmæli til fundin 7. feb. 2018.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við reglugerðini. Pkt. b varð umrøtt og samtykt at beina spurningum um staðseting í byggi- og býarskipanarnevndina.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**

Fyri at útvega og reka eina skoytubreyt komandi sesong er neyðugt at fáa greiði á nøkrum spurningum longu nú. Herundir viðv. staðseting, hvørt ein breyt skal leigast ella keypast umframt fígging av hesum.

Hesaferð er hugsað at breytin skal vera virkin frá umleið fyrst í november til medio januar, hetta tí at áhugin tykist vera størstur í byrjani av vetrinum.

Staðfestast kann at skal tilboðið vera aftur komandi sesong er neyðugt við eini eykajáttan í 2018, umframt fígging til møguligt keyp av eini breyt.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til møguliga eykafígging í 2018 til tess at leiga ella keypa eina skoytubreyt, ella at taka ein støðg í tænastuni til sesongina 2019/20.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at heita á umsitingina um at seta upp hóskandi valmøguleikar.

**Ískoyti**

Í verandi støðu er ikki avgerð tikin um aðrar møguligar staðsetingar til komandi sesong. Av tí at tíðin gongur undan og fyri at fáa greiði á fígging og um ynski heldur er at keypa eina breyt er neyðugt at taka eina støðu í mai-juni.

Tí verður tikið útgangsstøði í fall ein breyt skal vera til komandi sesong at hon aftur verður á Vaglinum. Vegna avbjóðingar við at fáa lendið heilt slætt, er frægast at nýta somu tøkni eins og higartil t.v.s. EPDM gummislangur við kølara v.m.

Tá ein meiri varandi staðseting er fingin, hevði verið meiri ynskilig við nýggjari tøkni við alurørum, men sum krevur eitt slættari lendi. Ætlandi verður breytin aftur umleið 25 m x 20 m. Ætlandi verða minst 2 veitarir spurdir um leigu av breytini. Eisini er ætlanin at bjóða raksturin av breytini út til minst 2 veitarar.

Fyri leigu av eini breyt, umframt flutning, tilgerð av lendinum undir breytini, uppseting, rakstur í 2018 (nov-des.) verður mett neyðugt við eini nettojáttan á uml. 750 tkr. Í verandi støðu eru umleið 480 tkr. tøkar, men meirnýtslan í 2017 var umleið 150 tkr. Sostatt er nettotørvurin fyri 2018 umleið 420 tkr.

Á fundinum verður játtanartørvurin og teknisku loysnirnar nærri greinaðar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at leiga eina ísskoytubreyt til sesongina 2018/19 og í hesum sambandi játta kr. 420.000 til kontu 5716 skoytubreyt. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta tær írestandi 420.000 kr. av konto 90210 sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

## 119/18 Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 54/14 | 14/00772-13 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 2/15 | 14/00772-13 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2015 | 14/15 | 14/00772-13 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 37/15 | 14/00772-13 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.03.2015 | 32/15 | 14/00772-13 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 243/15 | 14/00772-13 |
| 7 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 312/15 | 14/00772-13 |
| 8 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 245/15 | 14/00772-13 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 74/16 | 14/00772-13 |
| 10 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 11 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 75/16 | 14/00772-13 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 126/16 | 14/00772-13 |
| 14 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 175/16 | 14/00772-13 |
| 15 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 144/16 | 14/00772-13 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 171/16 | 14/00772-13 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 178/16 | 14/00772-13 |
| 18 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 240/16 | 14/00772-13 |
| 19 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 187/16 | 14/00772-13 |
| 20 Býráðsfundur | 26.07.2016 | 193/16 | 14/00772-13 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 32/17 | 14/00772-13 |
| 22 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 36/17 | 14/00772-13 |
| 23 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 85/17 | 14/00772-13 |
| 24 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 114/17 | 14/00772-13 |
| 25 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 182/17 | 14/00772-13 |
| 26 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 119/18 | 14/00772-13 |
| 27 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 147/18 | 14/00772-13 |
| 28 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 119/18 | 14/00772-13 |

**Lýsing av málinum:**

Í sambandi við fyrispurningar um nýggjan kirkjugarð í Hóyvík, hevur umsitingin gjørt uppskot til staðseting fyrr ávíst 5 ymiskar staðsetingarmøguleikar (j. nr. 2007-2037/4). Arbeitt hevur verið víðari við at kannað um eisini aðrir staðsetingarmøguleikar eru, og verður hervið víst á eitt økið afturat. Økið sum talan er um, liggur oman fyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og framtíðar innkomuvegin til Tórshavn, sum framhald av Dalinum Langa.

**Byggisamtyktin:**

Verandi serstaka byggisamtykt fyri hetta økið varð gjørd í sambandi við býarpartin Stórutjørn. Stórur partur av økinum er D2 og har, sum hetta endar eystureftir, stingur ein kíli av 4. grundumráði, hagi, seg inn millum D2 og A3 bústaðarøkið Inni á Gøtu.

**Økiseyðkenni:**

Norður-suðurgangandi dalskap við norðurendan av Dalinum Langa. Dalurin ella lægdin liggur nakað burtur frá Sambindingarvegnum (Klingran) og eru góðir møguleikar at staðseta

bygningar og parkeringsøki skamt frá vegnum. Í lívd av eysturhallandi skráa liggur vesturhallandi slætti við stórbærum útsýni norðureftir móti Sundalagnum og tí vakra Skálafirði.

**Nærøkini:**
Økið liggur vart og er ikki áloypandi í lendinum, millum 5 og 20 metur hægri enn bústaðarøkið Inni á Gøtu, og partvís afturundir lítla heygnum millum bæði økini.

**Víðkanarmøguleikar:**
Samlað økisvídd er 25.000 m², og góður møguleiki er at byrja við 3.500 - 5000 m² í lægdini undir brekkuni, fyri síðan at víðka norðureftir.

**Atkomuviðurskifti:**
Tætt við sambindingarveg, ið kann leiða nógva bilferðslu. Siðvenjan at ganga í gravarfylgi er komin til eitt vegamót, men eru her møguleikar, tí í beinari linju eru 950 m til kirkju og samkomuhús ígjøgnum fríøkið Dalurin Langi. Til sammetingar er beina leiðin millum Dómkirkjuna og kirkjugarðin við Velbastaðvegin 1250 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ongin fígging er avsett til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík. Útvegan av kirkjugarði í Hoyvík er ikki átrokandi, við tað at verandi kirkjugarður í Tórshavn hava nøktandi pláss enn.

**Niðurstøða.**
1. Kirkjugarður á hesum stað vil ikki ávirka verandi býarbygging.
2. Tað er av týdningi at kirkjugarðurin kann víðkast.
3. Kirkjugarðurin kann vera partur av frílendisætlan fyri býarbygging í Hoyvíkshaganum.
4. Siðvenja er at leggja kirkjugarðar uttanfyri býir og bygd øki, fyri síðan at býurin nærkast og at enda fevnir um økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til staðsetingarmøguleikar út frá fyriliggjandi uppskotum, og um arbeiðast skal víðari við málinum, og um so er, at játtað pening til fyrireikingar, herundir kanningar og projektering av skitsuuppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Formaðurin hevur ynskt málið á skrá til ummælis

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Um arbeiðast skal víðari við málinum, kann víðari gongdin í málinum verða:

1. Keyp av lendi
   Keyp av lendi 25.000 $m^2$ av matr. 135ed Hoyvíkshagi 3,5 mill.
2. Gerð av forprojekti
   Gera forprojekt til myndugleikaviðgerð
3. Borgarakunning
   Hava kunningarfund fyri borgarunum í Hoyvík
4. Myndugleikagóðkenning, friðingarnevndir, Føroya Stift
   Náttúru- og yvirfriðingarnevndarloyvi og loyvi frá Føroya Stift, kunngerð um kirkjugarðar.

5. Projektering/útbjóðingartilfar og útbjóðing
   At bjóða út til tvey projekterandi feløg at projektera, gera útbjóðingartilfar, bjóða út og hava lisitatión
6. Tíðarætlan
   Tíðarætlan keyp av lendi medio 2015, loyvir ultimo 2015, projektering og útbjóðing medio 2016 arbeiði kann byrja aftaná summarfrítíðina 2016.

Peningur er tøkur á karminum 6575 fyri 2014, men onki er játtað, til víðari arbeiði við málinum. Eingin fíggjarkarmur er avsettur á íløgum 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka støðu til, um verkætlanin skal setast í verk eftir leistinum sum skotin er upp, og um neyðugur fíggjarkarmur skal játtast til verkætlanina komandi ár, fyri 2016.
Verður avgjørt at arbeiða víðari við málinum, skal málið til teknisku nevnd til viðgerðar og fíggjarnevndina til samtyktar at leggja fyri býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Útsett til komandi fund, tá tað verður lýst og framlagt í sambandi við staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Tekniska nevnd 04. mars 2015**: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt kravfestingar til málið um kirkjugarðin í Hoyvík, sí hjálagda skjal. Fyrsta byggistig fevnir um gerð av lendi til 320 gravir, at skipa atkomuveg og parkeringspláss til 72 bilar, at byggja lítið arbeiðshús til amboð og uppihald. Umframt at garðurin skal girðast inni.

Kravfestingarnar siga, hvussu nýggi kirkjugarðurin ynskist skipaður. Kravfestingarnar eru grundskjal undir uppskoti til skipan, projektering, myndugleikagóðkenning/Føroya Stift, friðingarviðgerð, og til løgdeildina at fyriskipa og fremja keyp av lendi frá Búnaðarstovuni.

Ætlan er at bjóða projekteringina út í innboðnari lisitasjón. Tilboðini verða løgd fyri nevnd aftur, tá tey eru innkomin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við kravfestingarskjølunum, at bjóða projekteringina út, og at beina málið til løgdeildina at keypa lendi.
Mælt verður eisini til at játta kr. 500.000,- av karminum á konto 6275 Kirkjugarðar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 02. december 2015: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.**

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 10. desember 2015**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kirkjugarðurin í Hoyvík hevur verið úti í kapping, har tvær ráðgevarafyritøkur vórðu bidnar um at koma við einum skipanaruppskotið til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík, umframt tilboði upp á ráðgevarakostnað fyri 1. byggistig. Skipanaruppskotið varð vektað við 25% og ráðgevarakostnaðurin varð vektaður við 75%.

Fríggjadagin 26. februar 2016 komu undirhondsboðini frá tveimum ráðgevarafyritøkum inn.

Kostnaðarstøðið fyri ráðgevingina av 1. byggistigi var høgt og var eisini stórur munur millum tey tvey tilboðini, sum vórðu latin inn. Harumframt vóru kostnaðarmetingarnar fyri bygging av byggistigunum eisini høgar, og sostatt metti dómsnevndin, mannað av umsitingini, at vegna høga kostnaðarstøði, er ikki ynski at taka av nøkrum av tilboðunum, men heldur lata Býarskipan arbeiða víðari við verkætlanini, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samsýna bjóðarunum kr. 25.000 í part fyri luttøkuna, og at býarskipan arbeiðir víðari, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 09. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 200.000 sum eykajáttan av konto 5370 á konto 4118 og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 17. mars 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeitt verður við skipan av kirkjugarðinum. Býararkitekturin kemur at greiða frá tilgongdini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016: Kunnað varð um málið.**

**Ískoyti:**

Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til Kirkjugarðin í Hoyvík, sí viðheftu skjøl (14/00772-38, 1,2,3,4)

Í fyrsta byggistigi er pláss fyri umleið 380 gravum. Afturat tí er pláss fyri barnagravum, urnugravum og felagsøki við plássi til starvsfólk. 1. stig fevnir eisini um arbeiðsveg frá Klingruni inn á arbeiðsøkið, umframt útgrevstur til parkeringspláss. Umsitingin metir, at atkomuvegur og parkeringspláss eiga at vera ein sjálvstøðug teknisk verkætlan.

Skotið verður upp í fyrsta lagi at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð. Í útbjóðingini verða hesi arbeiði gjørd:

*Flytan og niðurtøka  av verandi stiki/hegni*
*Arbeiðsvegur inn á kirkjugarðsøkið frá Klingruni*
*Avgrevstur og burturbeining av tilfari av 1. byggistigi*
*Avvatning*
*Møgulig spreinging*

Tá øll neyðug loyvi frá myndugleikum, keyp av lendi og broyting av byggisamtykt er fingin til vega, verður útbjóðingartilfarið sent út til 2 arbeiðstakarar. Arbeiðstakararnir, ið eftir ætlan sleppa at bjóða, vera:
P/F Hansen & Jakobsen
Sp/f Hellisdal
Byrjað verður eftir ætlan 1. juni, og hetta arbeiðið er mett at taka 5 mánaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð eftir omanfyri standandi lýsing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Ískoyti.**
Løgdeildin hevur kannað møguleikarnar fyri at keypa lendið frá Búnaðarstovuni.
Festarin er hoyrdur og eru allir formalitetir í samband við avlýsing av tinglýstum, leigusáttmála og deklaratión á ognini eisini avgreiddir.

Búnaðarstovan hevur sent kommununi eina fyribils tilsøgn, keypsprísur 2.311.500,00.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at keypa lendið fyri 2,4 mill. kr. sum verður fíggjað av íløgukarminum 2016 á 6575 kirkjugarðar.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Frank Hellisdal og Sp/f ZRJ geva tilboð uppá 1. byggistig tann 6. juni 2016. Umsitingin viðger innkomnu tilboðini og ger tilmæli til fundin. Tilboðini verða løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 7. juni 2016.

**Tilmæli:**

Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal og Sp/f Z.R.J hava givið tilboð uppá 1. byggistig tann 6. juni 2016. Umsitingin hevur viðgjørt innkomnu tilboðini. Tilboðini eru løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 7. juni 2016.

2 tilboð eru innkomin. Tey eru áljóðandi:

| | |
|---|---|
| Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal | 5.159.000,00 kr. uttan mvg |
| Sp/f Z.R.J | 2.683.043,00 kr. uttan mvg |

Sp/f Z.R.J. hevur gjørt vart við eina roknivillu í tilboði teirra. Endaliga tilboðið er 4.340.543 kr. uttan mvg., og hetta stendur Sp/f Z.R.J. við. Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera 1. byggistig. Samlaði kostnaðurin er 5,4 milliónir.

Játtaðar eru kr. 500.000 til projektering. Av hesum eru kr. 405.000 eftir.
Á karminum til kirkjugarðar eru kr. 1.795.000. Neyðugt er sostatt við fígging 3,2 mió. afturat

Støða skal takast til, um takast skal av tí lægsta tilboðnum frá Sp/f Z.R.J. og hvussu restupphæddin á 3,2 mió. skal fíggjast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016: Útsett.**

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað málið. Umsitingin hevur sett seg í samband við sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, har kunnað hevur verið um málið, at lægri tilboðsveitari, Sp/f Z.R.J., hevur gjørt eina roknivillu og at endaligi tilboðsprísurin hjá Z.R.J. er 4.340.543 kr. uttan mvg. Umsitingin hevur heitt á sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal at koma við einum nýggjum tilboði, grundað á sama útbjóðingartilfar.
Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal boða frá, at teir standa við sítt tilboð, áljóðandi 5.159.000,00 kr. uttan mvg, og at um tilboðið skal broytast ella regulerast, er neyðugt at útbjóðingargrundarlagið eisini verður broytt.

Endaliga tilboðið hjá sp/f Z.R.J. er 4.340.543 kr. uttan mvg. Hetta stendur sp/f Z.R.J. við.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera 1. byggistig. Samlaði kostnaðurin er 5,4 milliónir.

Játtaðar eru kr. 500.000 til projektering. Av hesum eru kr. 405.000 eftir.
Á karminum til kirkjugarðar eru kr. 1.795.000. Neyðugt er sostatt við fígging á 3,2 mió. afturat.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum hjá sp/f Z.R.J. áljóðandi 4.340.543 kr. uttan mvg.
Eisini verður mælt til at fíggja restupphæddina á 3,2 mió. av íløgukarminum á 6275, Fríðkan av kommununi, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum. Samstundis verður heitt á umsitingina um at hava greiðar reglur, tá roknifeilir, sum ávirka prísin, verða staðfestir í tilboðum.**

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.**

Annnfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. juni 2016: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 26. juli 2016: Einmælt samtykt**

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri at gera kirkjugarðin í Hoyvík lidnan. Samlaði kostnaður er: kr. 13.659.359,00. Fyrsta byggistig á Kirkjugarðin í Hoyvík verður liðugt síðst í mars 2017. Skipan av økinum, avgrevstur og burturbeiningin av tilfari hevur gingið sera væl. Sprongt og brekkað er á økinum til tess at avvatna alt kirkjugarðsøkið. Atkomuvegur frá Klingruni gjøgnum kirkjugarðin er skipaður og grovplaneraður. Somuleiðis er parkeringsøkið grovplanerað.

Næsta byggistig er liður í eini størri ætlan at fáa gjørt kirkjugarðin lidnan. Her er talan um í fyrsta lagi at drena kirkjugarðin, og at breiða mold út í turru árstíðini. Turra árstíðin er frá mai - august 2017. Hetta arbeiðið má byrja skjótast gjørligt, um tað skal gerast í 2017. Samstarvið við verandi arbeiðstakara á Kirkjugarðin í Hoyvík, Z.R.J., hevur gingið sera væl. Møguleiki er at gera ein ískoytisavtalu við Z.R.J, av tí at teir longu eru á staðnum. Hetta verður mett at vera bíligari og skjótari enn at bjóða út av nýggjum. Somuleiðis skal havast í huga, at moldin skal liggja í umleið 1 ár at seta seg. Umsitingin hevur biðið um tilboð frá Z.R.J. at gera næsta byggistig.

Tilboðið frá Z.R.J á hetta arbeiðið er: kr. 4.252.485,00 uttan mvg.

Samlaði kostnaður á hetta arbeiðið er, sí Kostnaðarætlan C: kr. 4.786.703,00.

2 mió. kr. eru settar av íløgu karminum 2017 til Kirkjugarðar. Írestandi upphædd, sum neyðug er at játta í 2017: 2.8 mió. kr.

Av tí at arbeiðið við kirkjugarðinum ikki má steðga upp, so verður neyðugt í fyrstu atløgu at fíggja arbeiðið av øðrum verkætlanum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at taka av tilboðnum frá Z.R.J. og játta írestandi upphædd á 2.8 mió. kr. av kontantútgjaldinum í sambandi við eldsbrunan í AA-húsinum áljóðandi 1.63 mió. kr., umframt flyta 1.17 mió. kr. av játtanini til vegagerðina á Traðabrekku/Hoyvíksvegur, sí j.nr. 15/04352, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at játtað tilsaman 4,8 mió. kr. til kirkjugarðin í Hoyvík soleiðis: 2 mió. kr. av íløgukarminum 6575. Írestandi upphædd játtað av

Traðarbrekka/Hoyvíksvegur 1,44 mió. kr. og av AA-húsið 1,36 mió. kr. og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið á byggistig II í Kirkjugarðinum í Hoyvík er liðugt. Nú vantar liðuggerð av Kirkjugarðinum í Hoyvík: Her er talan um parkeringsøki og atkomuveg, kantsteinar, asfaltering, uppstriking, gøtur, gøtuljós, garður, portur, rørføringar, skúr til gravara, vollar, o.a. Mett er, at hetta arbeiðið tekur 1 ár at gera.
Mold er løgd út nú í Kirkjugarðinum í Hoyvík, og moldin tekur 1 ár at seta seg, áðrenn møguleiki er at jarða lík í kirkjugarðinum í Hoyvík.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting á hetta arbeiðið áljóðandi 6,7 mió. við mvg. Meiri peningur er ikki settur av íløgu karminum 2017 til 6575 Kirkjugarðar. Møguleiki er at játta samlaða kostnaðin á kr. 6.7 mió. av íløgukarminum 2018 fyri 6575 Kirkjugarðar.

Støða má takast til, hvussu útbjóðingarleisturin verður: Samstarvið við KONSAX hevur gingið sera væl. Skúrbýur og byggipláss er tilriggað, og teir kenna verkætlanina. Møguleiki er at gera ískoytisavtalu við KONSAX, av tí at teir longu eru á staðnum. Hetta verður mett at vera bíligari og skjótari enn at bjóða út av nýggjum. Hin møguleikin er at bjóða arbeiðið út til 2-3 arbeiðstakarar. Hetta krevur, at 150.000 kr. skulu setast av afturat til ráðgevakostnað at standa fyri at prosjektera verkætlanina liðugt og gera útbjóðingartilfar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekurin mæla til, at nevndin tekur støðu um útbjóðingarleist, hvørt liðuggerð av kirkjugarðinum í Hoyvík skal bjóðast út, ella biðið verður um tilboð frá verandi arbeiðstakara, KONSAX, at gera arbeiðið liðugt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017: Málið umrøtt.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið á byggistig II í Kirkjugarðinum í Hoyvík er liðugt. Nú vantar liðuggerð av Kirkjugarðinum í Hoyvík. Her er talan um parkeringsøki og atkomuveg, kantsteinar, asfaltering, uppstriking, gøtur, gøtuljós, garður, portur, kloakk og rørføringar, skúr til gravara, vollar o.a. Mett er, at hetta arbeiðið tekur 8-12 mánaðir at gera.

Moldin tekur 1 ár at seta seg, og moldin **hevur sett seg dd. í kirkjugarðinum í Hoyvík.** Talan verður um á leið 350 gravir í sum standa klárar at jarða lík í í dag.
Um vit samanlíkna við Kirkjugarðin við Velbastaðvegin, verða uml. 230 gravir í fyrsta lagi at klárar at jarða lík í komandi ár, av tí at moldin ikki hevur sett seg.

Møguleiki er at gera ískoytisavtalu við verandi arbeiðstakara, KONSAX. Samstarvið við KONSAX hevur gingið sera væl. Skúrbýur og byggipláss er tilriggað, og teir kenna verkætlanina. Arbeiðstakari kann byrja arbeiðið innan stutta freist. Í summar, um tað skal verða.
Loysnin verður mett at verða bíligari og skjótari enn at bjóða út av nýggjum. Vit spara eisini tíð og pengar í prosjektering. Konsax játtar at gera arbeiðið við somu kendu eindarprísum, sum við fyrru útbjóðing Í Hoyvík og við Velbastaðvegin. Verkætlanin er ment eftir

kravfestingum og skitsuuppskoti frá Býarskipanardeildini, og býargartnarin stendur inni fyri loysnum og linjunum í verkætlanini sum heild.

Umsitingin hevur biðið verandi arbeiðstakara, KONSAX, um tilboð at gera kirkjugarðin lidnan. Tilboðið er áljóðandi 6.885.296,00 mió. uttan mvg. Hesin peningur er enn ikki settur av á íløgukarminum 2018 til 6575 Kirkjugarðar.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting til liðuggerð av Kirkjugarðinum í Hoyvík. Samlaði kostnaðurin fyri at gera kirkjugarðin lidnan er: 8,5 mió. við øllum.

Møguleiki er at fíggja 8,5 mió. til verkætlanina Kirkjugarðurin í Hoyvík av konto 4176 hjá verkætlanini, Skúlin á Fløtum L41012, sum hevur pening tøkan í 2018, og síðani játta og flyta somu upphædd á 8,5 mió. aftur til skúlan á Fløtum av íløgukarminum 2019.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekurin mæla til at taka av tilboðnum frá KONSAX, gera eina ískoytissáttmála við KONSAX og játta upphædd á 8,5 mió. av konto 4176, íløgukarminum hjá verkætlanini, Skúlin á Fløtum L41012, og síðani játta og flyta somu upphædd á 8,5 mió. aftur á konto 4176 til skúlan á Fløtum av íløgukarminum 2019, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipaninarnevndini og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 24. mai 2018: Einmælt samtykt.**

# 120/18 Listaverkstøð í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 106/17 | 17/01361-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 173/17 | 17/01361-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 279/17 | 17/01361-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 324/17 | 17/01361-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 294/17 | 17/01361-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 6/18 | 17/01361-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 53/18 | 17/01361-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 107/18 | 17/01361-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 69/18 | 17/01361-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 146/18 | 17/01361-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 152/18 | 17/01361-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 137/18 | 17/01361-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 120/18 | 17/01361-1 |
| 14 Býráðsfundur | | | 17/01361-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu er m.a. orðað viðv. skapandi list:

**"Skapandi list, mentan og siðsøga í kommununi**
Íløgur í mentan og list, eru íløgur í okkara egna samleika. At kenna og vera partur av søguni, er ein virðismikil førningur og tí eiga søvn at verða sjónligir partar av høvuðsstaðnum.
...
Listahús eigur at útvegast, har listafólk í kveikjandi umhvørvi kunnu fáa frið at skapa. “

**Myndlistaverkstað í Finsen**
Slíkt verkstað kundi verið hugsað í ovaru høllini í Finsen (fyrrv. fimleikahallunum í fyrrv. kommunuskúlanum). (sí hjálagdar myndir og tekning).
Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fer at fáa hita frá Finsen.

Ynski er hjá myndlistafólki um at fáa betri møguleikar fyri verkstøðum. Ein fyrimynd er t.d. listaverkstað í Tróndheimi. Sí www.lkv.no

Høllin kundi verið avsett til verkstað hjá myndlistafólki og umsitin av myndlistafelagnum sbrt. nærri avtalu við kommununa viðv. upptøku, skipan, gjaldi v.m. Hugsanin er at rindast skal leiga fyri hølini og at tey so vítt til ber hvíla í sær sjálvum fíggjarliga.

Tað er hugsandi at har kundi verið einir 10-12 básar til listafólk.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av høllini v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Hugsanin er at minimalt skal gerast við hølini.

Ætlandi verður farið í samskifti við felagið hjá Myndlistafólki at gera uppskot til avtalu um, hvussu virksemi kann skipast har.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Býarskipanardeildin vísir á, at í heildarætlanini fyri Finsen hevur málið verið at ymisku hølini, sum eru afturat sjálvum lestrarbústøðunum skulu vera útatvend og bjóða býnum og borgarum inn o.s.fr. Ovara høllin er serstøk m.a. við góðum ljósi og útsýni til garðin í Finsen. Ein vandi við at gera myndlistaverkstað er, at virksemi verður ov innatvent og ikki uppnær endamálinum m.a. um at fáa lív í umhvørvi kring Finsen.

Tí er neyðugt, um avgjørt verður at fara víðari við hesi verkætlan, at umsitingin í dialoginum við listafólkini fær greinað, hvørt virksemi kann skipast soleiðis, at tað kann innganga í visjónina um útatvent virksemi, sjónliggera list, framsýningar o.a.
Hartil er hóskandi at verkætlanin verður gjørt tíðaravmarkað og eftirmett t.d. innan 1 ár.

**Grafiska listaverkstaðið í Finsen (listgrafo)**
Er longu lutvíst staðsett og íverksett í hæddini undir auluni.  Er ætlað til verkstað hjá listafólki innan grafikk (sí mynd og tekning). Hølini tilhoyra Bústaðir, men eru ætlaði til mentanarligt endamál,  har tað verður rindað fyri rakstur og bygningsviðlíkahald, men ikki beinleiðis leiga.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið fyri listagrafikarar. Hugsanin er áhugaði søkja um upptøku til at brúka hølini hjá felagnum sbrt. upptøkureglugerð sbrt. avtalu við kommununa um upptøku, skipan og gjald. Hugsanin er at rindast skal fyri hølini.
Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Áðrenn verkætlan kann fremjast er neyðugt at endalig avtala kemur við Bústaðir um bygningsviðlíkahald o.a.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Eins og fyri møguliga myndlistaverkstaðið, er hóskandi at skipa verkætlanina sum eina tíðaravmarkaða roynd og við eftirmeting.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um listagrafiskan verkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum
b) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um myndlistaverkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum.

**Mentamálanevndin 3. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum a og b.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið á fundi við umboð fyri Føroysk myndlistafólk og ListGraFo. Hesi hava latið inn uppskot/frágreiðing um, hvussu tey kundu hugsað sær at virka í hølunum í Finsen. Sí hjáløgdu skjøl.

Ein avbjóðing, sum serliga tykist gera seg galdandi fyri listgrafiska verkstaðin, er húsaleigan. Enn er ikki endaliga greitt, hvør fermetrakostnaðurin verður fyri raksturin av í listgrafisku hølunum og myndlistaverkstaðnum, men fyri tað fyrra helst nakrar túsund kr. um mánaðin og tað seinna nakað hægri.

Í tí sambandi hevur samband eisini verið við Tórshavnar Kvøldskúla um til ber at kombinera skeiðsvirksemi hjá skúlanum við virksemið hjá listgrafiska felagnum. Skúlin er sum útgangsstøði jaligur um hetta, og letur tað upp fyri virksemi, ið kann vera ymiskar tíðir á degnum gjøgnum alla vikuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til fundin í september.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 8. november 2017:**
Viðv. listgrafiska verkstaðnum

Samskifti hevur verið við felagið Listgrafo og Kvøldskúlan um møguleikarnar. Felagið ynskir at hava hølini burturav og sigur seg vera til reiðar at rinda fyri kostnaðin av hølunum. Endaligi kostnaðurin er treytaður av brúksavtaluni millum Bústaðir og kommununa. Hesin kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini 15. november 2017. Hølini vera ætlandi tøk seinni í november. Ávíst ivamál er um tørv á útsúgving til arbeiðið við vandamiklum løgi. Hetta er ikki kostnaðarmett.

Fyrivarni hjá umsitingini fyri hesi loysnini er mest um nýtslan av hesum serstaka høli verður nóg nógv til at felagið burturav skal hava tey.

Viðv. Myndlistaverkstaðnum

Samskifti hevur verið við Føroysk myndlistafólk um møguleikarnar. Umrøtt hevur verið antin at skipa tað sum verkstøð fyri tey sum eru at rokna sum yrkislistafólk. Hin møguleikin er at skipa virksemi meiri sum ein verkstað fyri yngri listafólk, ið ikki eru at rokna sum yrkislistafólk ella eina samanseting av báðum. Um fyrra loysnin verður valt metir umsitingin at tað er best um felagið sjálvt gerð avtalu við kommununa um virksemi og tekur sær av umsitingini av hølunum, upptøku v.m. Sum er eru hølini ikki klár at taka í nýtslu. Ymiskar ábøtur eru neyðugar. Herundir serliga viðv. brunaviðurskiftum, umframt aðrar ábøtur innan HVS, el v.m. Mett verður hóskandi at fáa ráðgeva at gera eina lýsing av viðurskiftunum. Umsitingin greiðir nærri frá hesum á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við tilmæli til komandi fund.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

**Viðv. Listgrafiska verkstaðnum**
Samráðingarnar við Bústaðir um brúksavtalu fyri Listatornið í Finsen eru lidnar og kemur málið ætlandi fyri í fíggjarnevndini í desember. Í rundum tølum fevnir fyrrv. Evningsstovan, um umleið 1/3 av fermetrunum í Listatorninum og skal felagið tá rinda umleið 5.000 kr. / mánaðin íroknað el&hita fyri hølini.

Samstundis verður mett, at tað hevði verið ynskiligt, um listgrafiska undirvísingin hjá Kvøldskúlanum var í somu hølum. Umsitingin og Kvøldskúlin meta at tað hevði verið ein fyrimunur og hevði kunna økt um nýtslustigið, umframt at Kvøldskúlin so kann nýta verandi listgrafiska hølið til onnur undirvísingarendamál. Eisini verður mett, at ein møgulig avtala eigur at vera tíðaravmarkað t.d. til 2 ár ella at hava møguleika fyri uppsøgn við rímiligum skotbráði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til og gera tilmæli til fíggjarnevndina um:
a). hvørt Listgrafo skal fáa í boði leigusáttmála
b). hvørt Listgrafo og listgrafiska virksemi hjá Kvøldskúlanum eigur at vera í felag í hølunum

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við loysn b og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireika arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri Myndlistaverkstaðið í Finsen. Sí hjálagt kostnaðarmeting v.m. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 524,7 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Møguliga kunnu einstakir postar takast út.

Støða er ikki tikin til fígging av verkætlanini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina og taka støðu til um um farast skal víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur spurt ráðgevan um hvat kostnaðurin vildi verið um ovara høllin verður umvæld, men ikki niðara. T.v.s. hvat krevst av umvælingum v.m. í trappuøkinum upp til ovaru høllina. Metingin er at 496 tkr. koma aftur í hondverkaraútreiðslum, umframt kostnaðurin til ráðgeving, ókent og mvg. T.v.s. uml. 631 tkr. Sí hjálagt tilfar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata hervið nevndini hesar upplýsingar til umrøðu við atliti til møguligt tilmæli á komandi fundi.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Umrøtt.

Ískoyti
Vísandi til samtyktina í mentamálanevndini 29. november 2017 hevur samskifti verið við Listgrafo um samhýsing í hølunum í Finsen saman við Kvøldskúlanum. Sí hjálagt uppskot til avtalu.

Fyri at fáa hølini klár til endamálið hjá Listgrafo og Kvøldskúlanum er neyðugt við ymiskum ábótum o.a. Hetta er mett til umleið 100 tkr. og verður ætlandi framt innan raksturin hjá Kvøldskúlanum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við uppskotinum til avtalu og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Málið er nú gjøgnumgingið av nýggjum saman við Húsaumsitingini, umframt at ráðgevin hevur samskift við byggivaldið um fyritreytirnar í verkætlanini. Byggivaldið boðar frá, at arbeiðast kann víðari við verkætlanini, tó so, at endaligt byggiloyvi skal fáast til vega, áðrenn farið verður í gongd.

Um ynski er at fara í gongd við at gera myndlistaverkstað í ovaru høllini, eru hondverkaraútreiðslurnar (HVÚ) mettar til 524,7 tkr. umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ), ókent (ca. 15% av HVÚ) og kommunalt MVG (6,25% av øllum postum). Um farið verður undir arbeiðið í ovaru høllini og ikki samstundis undir arbeiðið í niðaru høllini, er neyðugt at gera trappuuppgongdina millum báðar hallirnar. Metingin fyri tað arbeiðið er 496 tkr., umframt somu postar til ráðgeving, ókent og kommunalt mvg. Samanlagt gevur tað umleið 1,3 mkr.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión. Arbeiðið kann hóskandi verða boðið út í mai/juni til at verða útint tíðliga í heyst.

Við atliti til at fáa góðar prísir verður mett best, um arbeiðið í ovaru høllini var gjørt samstundis sum arbeiðið í niðaru høllini t.e. virknishøllini í Finsen – sí mál 17/01362, men er tað ikki alneyðug trey og krevur meirfígging uppá uml. 1,5 mkr.

Á løgukonto 5775 eru tøkar 921 tkr. fluttar frá verkætlan L57027 frá 2017 – sí mál 16/03404. Restin av fíggingini til verkætlanina, uml. 400 tkr., verður skotið upp at fíggjað av løgukonto 5775, smærri ítróttaanlegg, har 1,5 mkr. eru tøkar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðari á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir útboð av arbeiðinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen og Halla Samuelsen atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og játta kr. 921 tkr., ið eru tøkar fluttar frá verkætlani L57027 frá 2017 umframt 400 tkr. av løgukonto 5775, smærri ítróttaranlegg, sum eykajáttan til arbeiðið. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til at fara aftur til upprunaætlanina at nýta hølini til alment innandura spælipláss.

**Ískoyti:**
Í skrivið dagfest 17. mai 2018 hava býráðslimir fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin ynski um at fáa málið um hølisviðurskifti hjá Listgrafo á skrá til fyrst komandi býráðsfund.

**Viðv.sáttmála við Listagrafo um leigumál í Finsen, sum er góðkendur í bæði mentamálanevnd og fíggjarnevnd**.
Undirritaða fer vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði at biðja um at fáa eitt mál á skrá á næsta býráðsfundi. Tað snýr seg um leigusáttmálan, sum er gjørdur við felagsskapin Listagrafo um leigumál í Finsen.

Og sum eisini fevnir um, at Kvøldskúlin skal arbeiða har ávís avtalaði tíðspunkt. Hesin sáttmálin er sum skilst góðkendur tann 24. Apríl í ár.

Sum skilst hava tey nú fingið boð um, at tey ikki sleppa inn har kortini.

Hesum kunnu vit í andstøðuni ikki taka undir við. Tí hetta er ein tilgongd, sum hevur staðið uppá í nógv ár. Og tey hava bíðað í tolni eftir avtaluni, sum er staðfest í einum av bæði Mentamálanevndini og fíggjarnevndini góðkendum sáttmála – og sum listabólkurin eisini hevur góðtikið.

Soleiðis kann mann ikki fara við fólki, felagsskapum og skúlum – og tað kunnu vit í andstøðuni ikki góðtaka.

Tað verður víst til, at Skúlin á Fløtum skal disponera yvir hølunum. Vit hava sum andstøða ferð eftir ferð víst á, at sjálvandi skulu vit gera alt vit eru ment til tess at Skúlin á Fløtum kann húsast á so fáum matriklum sum møguligt, meðan bygt verður.

Og júst tú skutu vit upp, at Skúlin á Fløtum fekk Gamla realskúla at húsast í, inntil byggjaríið verður liðugt. Tá ber so til at gera Gamla realskúla um til ein dagstovn. Tørvurin á dagstovnaplássum eigur at verða loystur á annan hátt beint nú – til dømis við at brúka allan brúna Skúla til endamálið.

Vit fara tí at krevja málið á næsta býráðsfund, soleiðis at vit kunnu samtykkja, at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Vinarliga<br>
Vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði<br>
Helena Dam á Neystabø<br>
Heðin Mortensen<br>
Tróndur Sigurðsson<br>
Halla Samuelsen<br>
Bjørghild Djurhuus og<br>
Annfinn Brekkstein

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

## 121/18 Útstykking í Nólsoy - nevndarsamtyktir - broyting av byggisamtykt (2006-1856)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 125/15 | 14/01828-52 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 153/15 | 14/01828-52 |
| 3 Nólsoyarnevndin | 08.09.2015 | 6/15 | 14/01828-52 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 190/15 | 14/01828-52 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.10.2015 | 217/15 | 14/01828-52 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 23/16 | 14/01828-52 |
| 7 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 171/17 | 14/01828-52 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2017 | 139/17 | 14/01828-52 |
| 9 Nólsoyarnevndin | 20.06.2017 | 3/17 | 14/01828-52 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 161/17 | 14/01828-52 |
| 11 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 42/17 | 14/01828-52 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 179/17 | 14/01828-52 |
| 13 Nólsoyarnevndin | 18.09.2017 | 6/17 | 14/01828-52 |
| 14 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 177/17 | 14/01828-52 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 201/17 | 14/01828-52 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.09.2017 | 184/17 | 14/01828-52 |
| 17 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 218/17 | 14/01828-52 |
| 18 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 215/17 | 14/01828-52 |
| 19 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 215/17 | 14/01828-52 |
| 20 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 63/17 | 14/01828-52 |
| 21 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 269/17 | 14/01828-52 |
| 22 Nólsoyarnevndin | 14.11.2017 | 7/17 | 14/01828-52 |
| 23 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 272/17 | 14/01828-52 |
| 24 Nólsoyarnevndin | 05.04.2018 | 3/18 | 14/01828-52 |
| 25 Tekniska nevnd | 10.04.2018 | 24/18 | 14/01828-52 |
| 26 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 83/18 | 14/01828-52 |
| 27 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 103/18 | 14/01828-52 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 113/18 | 14/01828-52 |
| 29 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 88/18 | 14/01828-52 |
| 30 Nólsoyarnevndin | 29.08.2018 | 6/18 | 14/01828-52 |
| 31 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 32/18 | 14/01828-52 |
| 32 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 118/18 | 14/01828-52 |
| 33 Nólsoyarnevndin | 23.05.2018 | 5/18 | 14/01828-52 |
| 34 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 149/18 | 14/01828-52 |
| 35 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 121/18 | 14/01828-52 |

**Málslýsing**:
Av tí at fólk í Nólsoy hava spurt seg fyri hjá kommununi um grundstykki og hava fingið at vita, at eingin útstykking verður framd í bræði, vilja staðbundnu limirnir hava greitt at vita, hvørjar ætlanir kommunan hevur hesum viðvíkjandi.

Eisini vilja teir vita, hvussu er við ætlanini um randarhús og um til ber at keypa grundstykki uttan fyri hesa ætlan.

**Nólsoyarnevndin 13. juni 2006:** Nevndin mælir plandeildini til at gera eina útstykkingarætlan fyri økið, sum liggur oman fyri barnagarðin.

Kommunan eigur lendið, matr. nr. 159e.

**Ískoyti:**
Málið liggur í byggi- og býarskipanardeildini.

**Nólsoyarnevndin 12. september 2006:** Kunna varð um, at málið kemur fyri á fyrst komandi fundi í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Í byggisamtyktini fyri Nólsoy, kapittul IV § 18. øki A:Sethús stendur:

*Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m$^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggja ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 m$^2$, tó í minsta lagi 320 m$^2$ fyri serhús (einhúskishús) og 260 m$^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki*.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at útstykking verður samtykt sambært korti nr. 2006-1856/3 og send út til projekteringar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað projekteringina av útstykkingini út. Sí hjálagt yvirlit yvir innkomin tilboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin koma við tilmæli til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 15. januar 2007:** Nevndin samtykti at mæla til at taka av lægsta tilboðnum frá HMP konsult.

Harumframt mælti nevndin til at leggja málið fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og leggja út fyri kostnaðin.

**Ískoyti:**
HMP hevur gjørt projekt til útstykkingina og gjørt útbjóðingartilfar. Aftaná projektgransking er projektið klárt at bjóða út. Sambært fyribils kostnaðarmeting verður samlaði kostnaðurin:

Við neyðugar vegaføring: 2.447.374 kr. u/mvg svarandi til 2.600.334 kr. v.mvg. Fermetraprísur fyri grundstykkini kemur við hesi loysn at verða uml. kr. 600,00.
Við samlað vegaføring:3.550.766 kr. u/mvg svarandi til 3.772.688 kr.v mvg.
(Sí skjal nr.1 og 2). Fermetraprísur fyri grundstykkini kemur við hesi loysn at verða uml. kr. 850,00.

**Tilmæli:**
Býararkitektin og tekniski stjórin mæla til at velja uppskot nr.1 og at bjóða arbeiðið við útstykkingini út sum skjótast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, soleiðis at fyriliggjandi útstykkingarætlan rindar um helvtina av vegaføringini í uppskoti 1. Heitt verður á umsitingina um at fáa til vega útstykkingarætlan eystanfyri vegin, og at javna írestandi útleggi á hana. Harumframt mælti nevndin at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Ásannandi at prísurin pr.m² verður rættiliga høgur eftir verandi útstykkingarætlan, hevur umsitingin gjørt broytingaruppskot til ætlanina, soleiðis at grundstykkir verða báðumegin vegin. Eitt vanligt grundstykki á uml. 450 m² og 14 grundstykki á min. 260 m² verður soleiðis lagt afturat verandi uppskot. Hetta krevur tó at byggisamtyktin verður broytt og at kommunan ognar sær uml. 2650 m² av festijørð fra Føroya Jarðagrunni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broyttu útstykkingar ætlan sambært kortskjal nr. 2, og at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjal 1 og at byggi- og býarskipanarnevndin mælir fíggjarnevndini til at søkja Jarðargrunnin um keyp av 1400 m² av matr. nr 108 a, 1250 m² av matr.nr.107a og Vatnfelagið um keyp av matr.164 sum er 12 m².

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at taka upp samráðingar um keyp av økjunum.

**Nólsoyarnevndin 4. september 2007:** Skrivarin kunnaði um verkætlanina og tíðarætlan.

**Nólsoyarnevndin 27. november 2007:** Michael Jacobæus kunnaði um verkætlania.

Trupulleikar eru við helling av vegnum, sum samstundis merkir eitt grundstykki minni. Hetta kemur eisini, at ávirka tíðarætlanina. Arbeitt verður víðari við verkætlanini.

Frá tí at verkætlanin verður sett í verk, gongur umleið 1 ár til stykkini eru klár.

**Ískoyti:**
Í sambandi við útstykkingina hevur nólsoyarnevndin gjørt vart við at peningarstovnarnir ikki fara at fíggja sethúsabygging í oynni við tann metta m² prís. Umsitingin hevur minkað um útreiðslurnar til útstykkingina við at:

1. at taka verandi gongubreyt burtur projektinum
2. at býta útreiðslurnar til útstykkingina út á komandi útstykking eystanfyri og økini sum sambært byggisamtyktini er lagt út til stovnar og svimjuhøll.
3. at fíggja íbinding til verandi vegkervi yvir eina aðrari konto.

Soleiðis verður útreiðslan pr. m² minkað niður í 352,33 kr. pr m². Haraftrat skal leggjast íbindingargjald, grundprís og mvg, og verður fermetraprísurin tá mettur til tilsamans umleið 560 kr./m².

Víst verður til skjøl nr. 2006-1856/25 og 26.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna uppskotið hjá umsitingini og at góðkenna tekniska prosjektið, og at arbeiði síðani verður boðið út í innbodnari lisitatión.

**Byggi- og býarskipanarnevndin og tekniska nevnd 26. mai 2008:** Nevndirnar samtyktu at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 27. mai 2008:** Kunnað varð um málið.

**Nólsoyarnevndin 4. september 2008:** Michael Jacobæus kunnaði um málið.

**Nýtt:**
Mælt verður til at býta útreiðslurnar til umlegging av verandi vegur millum útstykkingina og konto 11. (sí hjálagt skjal nr. 2006-1856/32 "Kostnaðarmeting" og skjal nr. 2006-1856/33 Umlegging av verandi vegur/útreiðslur pr.m².

**Fíggjarnevndin 8. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Nólsoyarnevndin 2. desember 2008:** Michael Jacobæus kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur latið gjørt útbjóðingartilfar til útstykkingina, og 5 bjóðandi luttóku í útbjóðingini. 4 boð eru komin inn.

| | |
|---|---|
| Articon | 4.185.149 kr. |
| J&K Petersen | 5.391.947 kr. |
| Samtakið Hansen og Jacobsen | 6.182.898 kr. |
| Sp/f Andrias Berg | 4.663.805 kr. |

Lægsta boð er hjá Articon. Av tí at prísurin fyri grót ikki er innroknaður í tilboðsupphæddina, skal leggjast 33.000 kr. fyri keyp av gróti. Samlaða tilboðsupphæddin verður soleiðis 4.218.149 kr. Hjálagt er útrokning av samlaða fíggjartørvinum, sum er 5.508.806,59 kr. íroknað mvg, projekteringsútreiðslur, v.m. (Skjal nr. 2006-1856-38). Samanborið við kostnaðarmetingina (skjal nr. 2006-1856/32 "Kostnaðarmeting") er tað ein meirútreiðsla upp á 32.452 kr. svarandi til 2 kr. pr. m² í samlaðu útstykkingini (sí skjal nr. 2006-1856/37).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við lægsta tilboðnum og at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játta 5.508.810 kr.til ger av útstykkingini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. desember 2008:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina, kommunustjóran og miðfyrisitingarstjóran, um at staðfesta aktuella tørvin á grundstykkjum í Nólsoy, áðrenn støða verður tikin til tilboðini.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at lýsa í bløðunum at kommunan ætlar at gera útstykking í Nólsoy, og at møguligir keyparar biðjast boða Tórshavnar kommunu frá áhuga at keypa grundstykki.

**Nólsoyarnevndin 17. februar 2009:** Kunnað varð um útstykkingina, serliga tillutanina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at annulera byggibúningina, men at eini umsøkjarin, sum gjørdi vart við seg, fær møguleika at keypa grundstykki, og kemur at luttaka í heildarætlanini.

**Nólsoyarnevndin 2. mars 2010**: Nevndin umrøddi møguleikan fyri bústaðarskyldu í Nólsoy.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndarlimur biður um málið á skrá**.**

Annfinn Brekkstein ynskir umrøðu og møguliga støðutakan til sølu av grundstykkjum í Nólsoy. Uppskotið er at selja grundstykkini í Nólsoy fyri kr. 100.000 og at kommunan játtar fígging av restupphæddini, sum vantar í kostprísi. Grundgevingin er, at mett verður ikki, at tað ber til at sleppa av við stykkini fyri núverandi prís.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Umrøtt.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Nólsoyarnevndin 08. september 2015:** Umsitingin setir seg í samband við Bústaðir.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt yvirlit yvir møguleikan at lækka prísin á útstykkinginum í Nólsoy.
Birita Wardum, býararkitektur, kemur inn at greiða frá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mælir til at arbeiða víðari við málinum og beina málið í býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at arbeiða víðari við alternativi 4 í uppskoti til útstykkingarætlan, j.nr. 14/01828-56.

Tekniski stjórin ella býararkitekturin kemur at kunna um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur latið gera annað øðrvísi útstykkingaruppskot í Nólsoy (Alternativ 4).
Sambært bíðilistanum hjá Tórshavnar kommunu, er eingin skrivaður upp til grundstykki í Nólsoy.
Ein áhugabólkur úr Nólsoy hevur havt samband við kommununa um at skipa fyri íbúðarbygging í Nólsoy í staðin fyri útstykking til sethús, tí trupult er at fáa fígging til at byggja sethús í Nólsoy.

Umsitingin hevur tosað við Bústaðir um møguleikan fyri, at Bústaðir kunnu fara undir at byggja leigubústaðir í Nólsoy. Bústaðir eru áhugaðir, og verður í næstum farið undir at, kannað møguleikarnar fyri samstarvi um eina íbúðarverkætlan.

Tekniski stjórin og býararkitekturin kunna nevndina um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Minnilutin, sambandsflokkurin og javnaðarflokkurin biðja um at fáa málið á skrá komandi býráðsfund týsdagin 20. Juni 2017.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ynskið um at gera 5 grundstykki eystan fyri barnagarðin úti í Nólsoy byggibúgvin, hevur umsitingin hugt eftir uppskoti 3, sí skjalið *5 grundstykkir.pdf*, sum varð gjørt í sambandi við uppruna útstykkingarætlanina til sethúsabygging. Grundstykkini, sum eru partur av matr. 159e, liggja í sethúsaøki (A) í almennu byggisamtyktini og eru 500 m$^2$ til støddar.

Fyri at verkætlanin kann bjóðast út, verður biðið um heimild til at gera prosjekt liðugt til útbjóðing.

**Skjøl:**
- *5 grundstykkir.pdf, j.nr. 14/01828-56*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararitekturin mæla til at játta kr. 50.000 av konto 6475 til at gera prosjekt liðugt til útbjóðing og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 20. juni 2017:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Táverandi Nólsoyar kommuna lat gera ein útstykkingarveg undir Bøbrekku á matr. nr. 159e, Nólsoy.
Í sambandi við útstykkingina í Nólsoy, hevur umsitingin kannað verandi støðu á staðnum. Staðfest er, at talan er um eina grovplanering av einum umleið 5 m breiðum vegi, undir Bøbrekku, sum gongur frá Válavegi niðan við vesturmarkinum av matr. nr. 159e og eystur yvir ímóti vesturmarkinum av matr. nr. 16 og oman í Eyggjargøtu, Nólsoy.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt eitt uppskot til eina útstykkingarætlan á 5 grundøkir á umleið 500 m$^2$ hvørt, har atkomuvegurin verður 5 m breiður við bakkantsteini og 1 m strípaðari gongubreyt.

Ætlanin er at dagføra part av vegnum undir Bøbrekku við tekniskum installatiónum sum fyrireiking til, at tvey grundøkir at verða vestanfyri, og trý eystanfyri undir Bøbrekku, sum gongur niðan við vesturmarkinum av matr. nr. 159e, Nólsoy.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt eitt høvuðsprosjekt og útbóðingartilfar klárt til útbjóðingar og eina samlaða kostnaðarmeting B.

**Viðkomandi skjøl í málinum**
TK j. nr. 17/02280/1 Tekningar
TK j. nr. 17/02282/1 Útbjóðingartilfar
TK j. nr. 17/02286/1 Byggimálsfrágreiðing
TK j. nr. 17/02287/1 Arbeiðsfrágreiðing
TK j. nr. 17/02858/1 Kostnaðarmeting HVÚ
TK j. nr. 17/02858/2 Samlað kostnaðarmeting B

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, virkandi býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við teknisku verkætlanini, og at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð millum tveir lokalar arbeiðstakarar. Málið verður at leggja fyri aftur til endaliga støðutakan, tá tilboðini fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 18. september 2017:** Nevndin ynskir at fáa bústaðarskyldu knýtt at teimum 5 stykkunum í nýggju útstykkingini.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Fyrisitingin hevur skipað fyri útbjóðing sum innbodna lisitatión millum tveir arbeiðstakarar, H. V. Lützen P/f og Maskingrevstur v/Frank Hellisdal Sp/f.
Lisitatión var hildin á digitala prosjektportalinum iBinder 19. september kl. 14.00.
H. V. Lützen hevði lægra tilboðið.

**Tilboðini vóru hesi:**

| | |
|---|---|
| Hans Vilhelm Lützen P/f | kr. 1.858.815,- íroknað fordeilingslista B(T) |
| | **kr. 1.489.935,- uttan fordeilingslista B(T)** |
| Maskingrevstur v/Frank Hellisdal Sp/f | kr. 2.087.200,- íroknað fordeilingslista B(T) |
| | **kr. 1.715.050,- uttan fordeilingslista B(T)** |

**Kostnaðarætlan:**
Tekniska fyrisitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarætlan áljóðandi kr. 1.100.278,- grundað á tilboð frá Maskingrevstur við uppskoti um sparingar.

**Viðkomandi skjøl í málinum:**
TK j. nr. 17/02283/1 Tilboð frá H. V. Lützen
TK j. nr. 17/02283/2 Tilboð frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/02283/3 | Lisitatiónsprotokoll |
| TK j. nr. 17/02858/6 | Uppskot til sparingar grundað á tilboð frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal |
| TK j. nr. 17/02858/7 | Kostnaðarætlan A grundað á tilboð frá Maskingrevstur við uppskoti um sparingar |
| TK j. nr. 17/02858/10 | Innanhýsis notat_Kostnaðaryvirlit fyri hvørt grundøki sær |
| TK j. nr. 17/02280/1 | Matrikulplanur |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægra tilboðnum frá Maskingrevstur við tillagingum og sparingum áljóðandi kr. 910.477,- uttan fordeilingslista B(T) og fíggja áljóðandi kr. 1.100.278,- til verkætlanina av íløgukontoini fyri útstykkingar, deild 6475, góðkenna matrikulplanin, viðmæla sundurbýtið av útstykkingini og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. september 2017:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við báðar teir bjóðandi út frá innkomnu tilboðunum. Í fyrstu og aðru samráðingarrundu var Maskingrevstur lægstur.
Triðja samráðingarrunda innibar, at arbeiðstakarin veitir handverkara- og arbeiðs- og maskintímar, og at Tórshavnar kommuna veitir tilfar sum grót og tekniskar installatiónir og flyting av til fari út til Nólsoyar sum byggiharraveiting. Eisini er verkætlanin gjørd einklari fyri at fáa kostnaðin niður. Eitt dømi er at gera eina felags leiðingsgrøv í staðin fyri tvær leiðingsgravir í báðum vegasíðum.

**Kostnaðarætlan:**
Tilboðið frá H. V. Lützen uppá handverkara-, arbeiðs- og maskintímar er áljóðandi kr. 400.000,-. Umsitingin hevur gjørt eina kostnaðarætlan A við triðju samráðingarrundu við H. V. Lützen sum grundarlag áljóðandi kr. 750.000,- íroknað matrikulering og mvg men tó uttan asfaltering, prosjektering og eftirlit.

**Viðkomandi skjøl í málinum:**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/02858/12 | Uppskot til sparingar grundað á tilboðið frá H. V. Lützen uppá arbeiðs-, handverkara- og maskintímar, og at TK veitir tilfar sum byggiharraveiting |
| TK j. nr. 17/03305/4 | PLYNG_Udstykning på matr. nr. 159e, Nólsoy_Opdateret tilbud på materialer |
| TK j. nr. 17/03305/5 | Tilboð frá Lastkran v/Erling Dam uppá at flyta 300 m3 av tilfari frá Hundsarabotni og út til Nólsoyar |
| TK j. nr. 17/02858/13 | Kostnaðarætlan A_HVA_Dagfest 27102017_PAP |

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti:**

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 750.000,- |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 200.000,- |

| | **Býráðsfundur**<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 420 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato 27.10.2017 | Dato 19.03.2018 |
|---|---|---|
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

## Viðmerking:
Grundstykkjasølan skal fíggja verkætlanina.

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægra tilboðnum uppá arbeiðs- og handverkaraútreiðslur og maskintímar frá H.V. Lützen við tillagingum og sparingum áljóðandi kr. 400.000,-, og loyva byggiharraveitingum áljóðandi kr. 350.000,-, ella samlað áljóðandi kr. 750.000,- til verkætlanina av íløgukontoini fyri útstykkingar, deild 6475, verkætlan L64010, heimila umsitingini at gera arbeiðssáttmála við H. V. Lützen, góðkenna matrikulplanin, viðmæla sundurbýtið av útstykkingini og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fíggjarleiðarin mæla til at verkætlanin verður fíggja av ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjunum í árinum.

**Nólsoyarnevndin 14. november 2017:** Nevndin tekur undir við tilmælinum og ynskir framhaldandi at fáa bústaðarskyldu knýtt at teimum 5 stykkunum í nýggju útstykkingini.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lutakast hevur verið av teimum 5 grundøkjunum 23. mars 2018 í Posthúskjallaranum. 7 ítøkiligir keyparar vóru til grundøkini, 2 fingu tí ikki tillutað grundøki. Tey 5 grundøkini eru merkt við nr. 1, 3, 4, 5, og 6, og tey tvey, sum ætlanin er at leggja aftur at, eru merkt við nr. 7 og 8 á dagførda matrikulplaninum.

Av tí at eftirspurningurin er so stórur, hevur umsitingin gjørt eina heildarætlan fyri alla útstykkingina á matr. nr. 159e, 107d og 108a. Víst verður til dagførdan matrikulplan, sí TK j. nr. 17/02280-2.

Hædd er tikin fyri, at til ber at víðka útstykkingina uttan at fara at grava í vegnum sum nú verður dagførdur aftur.

Matr. nr. 107d og 108a er ogn hjá Føroya Jarðargrunni. Økið omanfyri vegin undir Bøbrekku er nakað bratt, og tískil verður hildið betri at fara longur eystur við grundøkjunum, og nýta vestara økið til fríøki.

Neyðugt er at fara í samráðingar við arbeiðstakarin um at víðka arbeiðstøkuna av 5 grundøkjum til 7 grundøkir.

**Matrikuler viðurskifti**
Tórshavnar kommuna eigur undirlendið undir teimum tveimum grundøkjunum sum ætlanin er at leggja afturat (nr. 7 og 8). Skal øll útstykkingar ætlanin fremjast, má kommunan ogna sær part av matr. nr. 107d og 108a.

**Viðkomandi skjøl í málinum**
TK j. nr. 17/02280-3 Matrikulplanur_03042018_PAP

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðtaka nýggja matrikulplanin og at heimila umsitingini at taka upp samráðingar við arbeiðstakaran um at víðka arbeiðstøkuna av teimum 5 grundøkjunum til at fevna um 7 grundøkir, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Nólsoyarnevndin 05. apríl 2018:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðstakarin hevur latið kommununi eitt tilboð áljóðandi kr. 180.000,00 uttan mvg í arbeiðsløn fyri at gera 2 grundstykkir afturat, sum víst á nýggja matrikulplaninum j.nr. 17/02280-3.
Samlaði kostnaðurin fyri at gera 2 grundstykkir aftur verður kr. 300.000,- alt íroknað, sambært kostnaðarætlan A, sí j.nr. 17/02858/14.
Søluprísurin fyri grundstykkini kann verða kr. 165.000 pr/stk., sum er tað sama sum fyri tey fyrstu 5 grundstykkini, sum eru útlutaði.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/02280-3 | Matrikulplanur_03042018_PAP |
| TK j. nr. 17/03305-6 | Tilboð frá H. V. Lützen |
| TK j. nr. 17/02858-14 | Kostnaðarætlan A |

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til:
- at góðtaka nýggja matrikulplanin og at víðka arbeiðstøkuna við 2 grundøkjum, soleiðis at tað íalt verða gjørd 7 grundøkir.

- at taka av ískoytistilboðnum frá H.V. Lützen, um at gera 2 grundstykkir afturat, áljóðandi kr. 191.250,- v/6,25% mvg.
- at tilfar o.a. verður byggiharraveiting, fyri íalt kr. 108.750,- v/6,25% mvg.
- at arbeiðið, fyri íalt kr. 300.000,- v/6,25% mvg verður fíggjað av íløgukontoini fyri útstykkingar, deild 6475, verkætlan L64010.
  at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eina heildarætlan fyri útstykkingina til 15 grundøkir, íroknað tey 7, sum longu eru samtykt. Av tí at ov bratt er omanfyri grundøkini nr. 2, 3 og 4, er neyðugt at fara longur eystur við grundøkjunum nr. 13, 14 og 15.
Um planurin at víðka útstykkingina til íalt 15 grundøkir skal bera til, er neyðugt at útvega meiri lendi til endamálið.
Umsitingin hevur gjørt eina matrikultekning, sum lýsir marknaumskipanina ella keyp av lendi.

**Uppskot 1_Marknaumskipan**
Matr. nr. 107d letur 1253 $m^2$ til matr. nr. 159e
Matr. nr. 108a letur 209 $m^2$ til matr. nr. 159e
Matr. nr. 159e letur 21 $m^2$ til matr. nr. 108a
Matr. nr. 159e letur 1441 $m^2$ til 107d

Matr. nr. 164 á 12 $m^2$, sum er ogn kommununnar, verður lagt afturat matr. nr. 159e

Í sambandi við marknaumskipanina letur kommunan líka nógvar fermetrar sum hon fær frá Búnaðarstovuni.

**Uppskot nr. 2_Keyp av lendi**
Keyp av (209 – 21)= 188 $m^2$ av matr. nr. 108a, Nólsoy
Keyp av 1253 m2 av matr. nr. 107d, Nólsoy
Keyp av matr. nr. 164 á 12 $m^2$ frá vatnfelagnum í Nólsoy

Gongurættur verður lýstur á matr. nr. 107d frá matr. nr. 159e og niðan til litraøkið, matr. nr. o.

**Viðkomandi skjøl í málinum**
TK j. nr. 17/02280-4 Matrikulplanur_01052018_PAP

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at ogna sær lendi frá Búnaðarstovuni og lýsa gongurætt á matr. nr. 107d frá matr. nr. 159e til litraøkið, og loyva umsitingini at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendi og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir  við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018**: Einmælt samtykt**.**

# 122/18 Nýggjar kommunulæknaviðtalur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 11.12.2017 | 52/17 | 17/04062-1 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 318.1/17 | 17/04062-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 08.01.2018 | 3/18 | 17/04062-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 05.02.2018 | 9/18 | 17/04062-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 37/18 | 17/04062-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 64/18 | 17/04062-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 71/18 | 17/04062-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 13.03.2018 | 18/18 | 17/04062-1 |
| 9 Trivnaðarnevndin | | | 17/04062-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 128/18 | 17/04062-1 |
| 11 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 79/18 | 17/04062-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 161/18 | 17/04062-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 122/18 | 17/04062-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | | | 17/04062-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Heilsumálaráðið hevur fráboðað kommununi, at tveir nýggir læknar eru normeraðir til Tórshavnar kommunu at seta skjótast gjørligt.

Kommunan skal í hesum sambandi fáa til vega nýggj læknaviðtaluhøli. Harumframt verður mett, at læknaviðtalurnar í Frúutrøð og Berjabrekku ikki lúka nútíðarkrøv. Talan er sostatt um 6 læknaviðtalur.

Fyrisitingin kannar í løtuni møguleikar fyri at útvega høli at leiga soleiðis, at til ber at savna læknar í t.d. 2 deplum.

Greitt verður nærri frá, hvørjir møguleikarnir eru sum grundarlag fyri støðutakan til víðari tilgongd.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Trivnaðarnevndin 11. desember 2017**: Umrøtt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Kunnað verður um málið.

**Trivnaðarnevndin 08. januar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Trivnaðarnevndin 05. februar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sum kunnað er um áður, hevur fyrisitingin arbeitt við møguligum leigumáli bygningurin Smyrilsvegur 20 á Hálsi (matr.nr. 1326z) til tess at hýsa seks kommunulæknum.

Støðið undir hesum er, at landsstýrið hevur fráboðað, at tvey nýggj kommunulæknastørv skulu skipast í Tórshavnar kommunu. Harumframt metir fyrisitingin, at viðtalurnar í ávikavist Frúutrøð og Berjabrekku, sum tilsamans fevna um fýra kommunulæknar, ikki longur nøkta nútíðarkrøv til kommunulæknaviðtaluhøli, og tí eiga at verða niðurlagdar.

Harumframt hevur Heilsutrygd biðið kommununa um at veita høli til einar tríggjar kliniskar dietistar. Kommunulækni kann ávísa borgarar til kliniskan dietist, sum Heilsutrygd hevur í starvi. Virksemið hjá klinisku dietistunum fevnir um alt landið, men burtursæð frá Suðuroy virka allir í dag í høvuðsheitum í og út frá ymsum kommunulæknaviðtalum í Havn, men hava ikki nøktandi pláss. Heilsutrygd hevur ynski um, at klinisku dietistarnir eru savnaðir í Havn.

Heilsutrygd hevur eisini biðið um, at smábarnavirksemið hjá Gigni fær høli frá kommununi. Hetta virksemið heldur í dag til í hølum hjá landinum (Kristnastova), ið ikki eru egnaði til virksemið. Sambært tulking frá Heilsumálaráðnum (sí skjal) eiga kommunurnar at bera útreiðslur til høli og útbúna til heilsufrøðingar sambært lógini um fyribyrgjandi heilsukanningar hjá børnum og ungum.

Kommunan hevur við støði í hesum heitt á ráðgeva SNA Arkitektur/Árni Winther Arkitektar um at gera uppskot til innrætting at hýsa øllum teimum omanfyri nevndu endamálunum í bygninginum Smyrilsvegur 20. Eisini hevur kommunan havt samskifti við kommunulæknar og Heilsutrygd um tørvin bæði viðvíkjandi kommunulæknaskipanini, klinisku dietistunum og Gigni.

Ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á kommunulæknaøkinum er ásett í *lóg um kommunulæknaskipan*, har tað er ásett, at Heilsutrygd setir kommunulæknar og avloysarar í starv, og at kommunurnar útvega og rinda viðtaluhølir við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknan. Krøvini til kommunurnar hesum viðvíkjandi eru so aftur útgreinað í *kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum*.

Við støði í samskiftinum við kommunulæknarnar er greitt, at formliga grundarlagið, her serliga viðvíkjandi kunngerðarkrøvunum um høli, als ikki er í samsvari við faktiska virksemið í fleiri av viðtalunum. Fleiri kommunulæknar hava eitt nú útbúgvingarlækna starvandi í viðtaluni, men lóg og kunngerð fyrihalda seg ikki til økta hølis- og rakstrartørvin, ið hesin hevur við sær. Samstundis er hetta tó við til at betra um tænastuna til borgaran og av størsta týdningi til tess at fáa vega nýggjar kommunulæknar.

Ásannandi ósamsvarið millum formligu krøvini til kommununa sambært kunngerðini og hølistørvin, sum faktiska virksemið í viðtalunum í dag krevur, so hevur kommunan heitt á ráðgevan um at gera uppskot til innrætting, sum í ávísan mun víkir frá kunngerðini, ið her

heldur verður sæð sum ásetingar um minstukrøv til viðtalur, fyri á tann hátt betri at kunna nøkta tørvin og ynskini hjá kommunulæknunum til nútíðar viðtalur.

<u>Bygningurin og uppskot til leigusáttmála</u>

Talan er um 2.680 fermetrar stóran bygning. Atkomuviðurskiftini eru góð, parkeringsmøguleikarnir somuleiðis góðir. Sambært ráðgevunum er upprunabygningurin í góðum standi og úr góðum tilfari. Bygningurin hevur gjøgnum tíðina verið brúktur til ymisk endamál, og skal bygningurin hýsa kommunulæknaviðtalum v.m., er neyðugt at skipa innrættingina øðrvísi, ið eisini hevur við sær ávísar broytingar í installatiónum, umbygging av vesum v.m.

Eitt fyribils uppskot til innrætting og skipan av bygninginum bæði til kommunulæknaviðtalur, høli til klinisku dietistarnar og til heilsufrøðingarnar hjá Gigni er gjørt. Staðfest er, at til ber at skipa seks kommunulæknaviðtalur í bygninginum við nøktandi tali av hølum í part – tríggjar í hvørjari hædd, umframt høli til klinisku dietistarnar og Gigni.

Ráðgevin arbeiðir nú víðari við uppskotinum saman við kommununi, brúkarum og Heilsutrygd. Eitt neyvari projektuppskot góðkent av brúkarum og kostnaðarmeting ætlast latið kommununi at góðkenna umleið 20. apríl. Tá projektið er góðkent skal arbeiðið bjóðast út, og fyrr enn tá ber ikki til at staðfesta endaliga byggikostnaðin. Harumframt kemur kostnaður til útgerð, tól og innbúgv.

Samráðst hevur verið við P/F Betri, ið er eigari av bygninginum, um leigusáttmála, sí hjálagt. Í uppskoti er 15 ára leigusáttmáli, har leigan er kr. 1.100,00 fermeturin um árið. Hetta svarar til mánaðarliga leigu uppá kr. 245.667 u/mvg. Árliga leigan verður javnað við støði í tí seinasta upplýsta brúkaraprístalinum, tó í minsta lagi 1% og í mesta lagi 2,5% um árið.

Í samskiftinum við P/F Betri hevur verið umrøddur møguleikin fyri ískoytisavtalu til leigusáttmálan, har útleigarin í fyrstu atløgu ber kostnaðin av at gera tillagingarnar í bygninginum og at útvega útgerð, tól og innbúgv til virksemið. Tá kostnaðurin er endaliga goldin, rindar kommunan hann aftur við rentu til útleigaran yvir sama tíðarskeið sum leigusáttmálin. Endaligt uppskot til slíka avtalu kann ikki gerast fyrr enn ein ítøkilig kostnaðarmeting er tøk ella tá útboð hevur verið, men metast má neyðugt, at prinsippiel støðutakan til henda leist eigur at verða tikin longu nú, so at til ber at halda fram við fyrireikingunum, harundir neyðug útboð. Alternativ til henda leist er at fíggja ætlanina yvir íløguætlan kommununnar.

<u>Rakstur</u>

Kommunulæknatænastan í Tórshavnar kommunu økist sum omanfyri lýst við tveimum ársverkum. Hædd er ikki tikið fyri hesum á kontu 2210 kommunulæknatænastur í fíggjarætlanini 2018. Hetta hevur við sær øktan fíggjartørv til vanliga raksturin. Leigumálið í sjálvum sær hevur harumframt øktar rakstrarútreiðslur við sær. Hinvegin eigur leigumálið í Berjabrekku at verða sagt upp, og harvið kunnu mótroknast kr. 240.000 í leigugjaldi árliga. Frúutrøð er kommunal ogn.

Mett verður, at økta virksemið og broyttu fortreytirnar annars undir verandi rakstrarjáttan, har tað eisini verður farið úr tveimum bygningum, hevur við sær so mikið stórar broytingar, at játtanin til kontu 2210 kommunulæknatænastur eigur at verða endurskoðað sum liður í neyðugu eykajáttanini fyri inniverandi fíggjarár. Aftrat kemur lutfalsligi kostnaðurin av møguligu ískoytisavtaluni umrødd omanfyri.

Partur av leigumálinum er ætlaður smábarnavirkseminum hjá Gigna. Heilsufrøðiskipanin hevur egnað rakstrarkontu 2211, men fevnir í dag bert um heilsufrøðiskipanina í fólkaskúlunum, sum Gigni eisini stendur fyri, og sum hevur viðtaluhøli í skúlunum. Sum omanfyri lýst er tulkingin, at kommunan eisini eigur at bera útreiðslur til høli og útbúna til allar fyribyrgjandi heilsukanningar hjá børnum og ungum, tvs. eisini teimum undir skúlaaldri. Í sambandi við smábarnavirksemið er talan um uml. 8 starvsfólk. Sambært uppskotinum til innrætting skal Gigni hava nakað undir 200 fermetrar, tó felagsøki og tøknirúm v.m. (kjallarin) undantikið. Hesin partur av leigumálinum eigur at verða bókaður á kontu 2211 heilsufrøðiskipanin samsvarandi lutfalsligu fermetrunum av samlaða leigumálinum, harundir eisini møguligu ískoytisavtaluni umrødd omanfyri. Harumframt skal leggjast upp fyri hægri rakstrarútreiðslum. Eisini henda konta eigur tí at verða endurskoðað sum liður í neyðugari eykajáttan.

**Samanumtikið:**
Til tess at fremja ætlanina skal avgerð takast um hesi viðurskifti:

- Fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála við P/F Betri um bygningin Smyrilsvegur 20, kostnaður kr. 245.667 um mánaðin fyrsta árið

- Uppskot um at gera ískoytisavtalu til leigusáttmálan viðvíkjandi útlegg og afturrindan av byggikostnaði v.m.

- At viðtalurnar í Frúutrøð verða niðurlagdar, tá nýggjar eru tøkar

- At viðtalurnar í Berjabrekku verða niðurlagdar, tá nýggjar eru tøkar, og at leigusáttmálin hesum viðvíkjandi verður uppsagdur

- At konturnar 2210 og 2211 fáa eykajáttan til kostnaðin av leigusáttmálanum, ískoytisavtaluni og broytta raksturin annars.

Harumframt skal støða takast til endaliga projektuppskotið, útboð v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin leggja málið til umrøðu sum grundarlag fyri seinni avgerð, tá samlað kostnaðarmeting og fígging fyriliggur.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Útsett.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá**.**

## 123/18 Miðbýarætlan - Steinatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 61/14 | 14/05065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 331/14 | 14/05065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 258/14 | 14/05065-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 240/15 | 14/05065-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 49/16 | 14/05065-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 58/16 | 14/05065-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 45/16 | 14/05065-1 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 26/16 | 14/05065-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 133/16 | 14/05065-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 135/16 | 14/05065-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 18.05.2016 | 60/16 | 14/05065-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 189/16 | 14/05065-1 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 134/16 | 14/05065-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 269/16 | 14/05065-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 378/16 | 14/05065-1 |
| 16 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 304/16 | 14/05065-1 |
| 17 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 58/17 | 14/05065-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 214/17 | 14/05065-1 |
| 19 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 79/17 | 14/05065-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 225/17 | 14/05065-1 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2017 | 241/17 | 14/05065-1 |
| 22 Tekniska nevnd | 12.12.2017 | 81/17 | 14/05065-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 88/18 | 14/05065-1 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 124/18 | 14/05065-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 146/18 | 14/05065-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 123/18 | 14/05065-1 |

### Málslýsing:

Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Zeta arkitektar, sum fingu fyrstu virðisløn í kappingini hava gjørt eina fyribils kostnaðarmeting fyri 1. byggistig av prosjektinum við Steinatún. 1. byggistig fevnir um betraði ferðsluviðurskifti, nýggjan flísa- og steinbelegning, uppfylling av steinagøtu oman ímóti Bank Nordik bygninginum, nýggja uppihaldstrappu við Tilhaldið, ljós og planting.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, sum ikki er gjøgnumarbeitt, og er tí rættiliga óviss. Hædd er heldur ikki tikin fyri møguligum trupulleikum við undirlendinum, og at arbeiðið skal ganga fyri seg á einum vegastrekki við nógvari ferðslu.

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 14,4 mió. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 17,4 mió.

Í sambandi við ætlanina, hevur umsitingin biði Rambøll um tilboð uppá eina ferðslukanning við simulering av broyttu umstøðunum við Steinatún. Rambøll kann gerða hetta fyri kr. 60.000,-.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.000 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini, sum er mett at kosta íalt 15-20 mió.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, eigur projekteringin at verða sett í gongd, umframt kanningar av leiðingum, ferðslukanning v.m.

Projekteringin er mett til kr. 1.300.000
Ferðslukanning er mett til kr. 60.000

Verður peningur játtaður, eigur tað at fara av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at gera eina ferðslukanning og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 60.000 av íløgum til miðbýarætlanina. Eisini samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Í sambandi við arbeiði við miðbýarætlanini, eru ymiskar kanningar gjørdar, umframt at ein meirnýtsla hevur verið í sambandi við arkitektakappingina, hetta er gjørt upp til íalt kr. 510.022,- harav kr. 181.418,75 er meirnýtsla og kr. 328.603,25 til ymiskar kanningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. 60.000,- til ferðslukanning við Steinatún, umframt kr. 510.022,00 til at gjalda omanfyri nevndu rokningar, soleiðis at tað íalt verða játtaðar kr. 570.022,00 av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at játta kr. 60.000 til ferðslukanning við Steinatún, ið verður at játta av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Ferðslukanningin av Steinatúni, sum bleiv samtykt at gera á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 28. november 2014, er nú liðug.

Ferðslukanningin tekur støði í verandi viðurskiftum, grundað á teljingar av bilum, gangandi fólki og bussleiðini í Steinatúni í meldurtíðini frá kl. 15.30 til 16.30 ein vanligan dag.

Miðað var eftir loysnum at tøma Steinatún fyri bilar i tíðarbilum við ferðsluljósum við Niels Finsens gøtu og Tórsgøtu samsvarandi vinnandi projektuppskotinum frá arkitektakappingini fyri miðbýin frá ZETA arkitektar.

Niðurstøðan í kanningini vísir, at miðal bilrøðirnar við Steinatún í meldurtíðini vilja verða nakað longri enn í dag, meðan longstu bilrøðirnar verða somu longd sum í dag.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um peningur skal játtast til projektering av 1. byggistigi av projektinum við Steinatún.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt skipanaruppskot fyri Steinatún. Sí Hjáløgdu skitsu j.nr. 14/05065-8. Býarskipanardeildin mælir til, at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, til projektering av Steinatúni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 500.000 kr. av konto 6275 Fríðkan av kommununi til projektering av Steinatúni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ferðslunevndin skal taka støðu til fyriliggjandi uppskot um ferðsluviðurskiftini á Steinatúni.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Málið umrøtt. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
BYARSKIPAN hevur fingið gjørt projekt klárt at bjóða út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at bjóða uppá. Ráðgevararnir hava mett um tíðarætlanina fyri verkætlanina og meta at tað ber til at gera nevndan part av Steinatúnsverkætlanini lidna til 15. juli í ár.

Sostatt er klárt at bjóða hetta arbeiðið út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at innheinta tilboð, at leggja aftur fyri nevnd og býráð til støðutakan á komandi fundi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið út í undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Arbeiðið er boðið út framíhjá og vóru tilboðini hesi uttan MVG:

- P/F Articon: kr. 4.479.578,-
- Sp/f TG Verk: kr. 3.926.120,-

Umsiting kommununnar er í samráðingum við Sp/f TG Verk um sáttmála um arbeiðið og hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting (sí j. nr. 14/05065-25) fyri arbeiðið við støði í tilboðnum frá TG-Verk, har prosjektering, byggileiðsla, fakeftirlit, byggiharraveitingar, óvæntað, MVG v.m. er íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera sáttmála við TG-Verk um arbeiðið og at játtaðar verða kr. 5.596.000,- av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, afturat teimum kr. 500.000,- sum áður eru játtaðar til prosjektering. Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at útvega fleiri parkeringspláss í Tórsgøtu beinanvegin.

**Tekniska nevnd 18. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í framhaldandi menningini av Steinatúni, so hevur umsitingin fingið ráðgeva at gjørt uppskot til tak/skýli at staðseta í Steinatúni.

Skýlið kemur at virka sum bæði eitt bussskýli, umframt eitt tak til uppihald. Talan er um at gera eitt eyðkent bussskýli í høgari góðsku, umframt at ætlanin er at gera eitthvørt, sum víkir frá verandi bussskýlum, so sum eina til tvær reiggjur, har fólk kunnu stytta sær um tíðina, meðan bíðað verður eftir bussinum. Sí skjal nr. 14/05065-41, sum vísir hvussu skýlið kemur at taka seg út á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at íverkseta projektering, útbjóðing í heildarveiting og uppseting av bussskýlinum, umframt at játta umsitingini at fara undir at planleggja næsta byggistig av Steinatúni, sum er at umbyggja norðaru síðuna av Steinatúni og at játtaðar verða kr. 2 mió. av konto 6275 til hesi arbeiðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Kunnað varð um málið.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Verandi uppskot leggur ikki upp til lívd í mun til regn og vind, tí hevur verið tosað við ráðgevan frá Zeta Arkitektar um at gera nýtt uppskot til sjálvt skýlið undir hálvtekjuni.

Kunnað verður um nýggja uppskotið á fundinum, har ráðgevin kemur at greiða frá broytingini, ið skal tryggja lívd til tey, ið bíða eftir bussinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna nýggja uppskotið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um annað alternativt uppskot - *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti og tilmæli kemur mánadagin**.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið til høldar ráðgevarasáttmála við Zeta Arkitektar áljóðandi 324.600,00 kr. uttan mvg. at standa fyri høvuðsprosjekti, útbjóðing og eftirliti av býartorginum í Steinatúni. Zeta Arkitektar hava bjóðað arbeiðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar P/F Articon og Sp/f TG-Verk.

Tilboðini eru soljóðandi:

Articon: 3.645.953,00 kr. uttan mvg.
TG-Verk: 2.798.258,00 kr. uttan mvg.

Zeta Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við TG-Verk, sum høvdu lægsta tilboðið, til tess at finna sparingar. Í tilboðnum varð biðið um tvær loysnir á antin holaðar (perforera) koparveggir ella herdaðar glasveggir, soleiðis at byggiharrin sjálvur hevur møguleika at velja. Stødd og snið tað sama, sum lýst í útbjóðingartilfarinum. Niðurstøðan er, at glasið er

munandi bíligari frá báðum tilboðsveitarum. Herdað glas er somuleiðis ein tilfarsloysn, ið skapar ljósari sjónligari umhvørvi í býartorginum, í mun til holaðar (perforeraðar) koparplátur. Um tikið verður við hesari loysn og sparingum er tilboðið hjá TG-Verk áljóðandi:

TG-Verk: 1.722.115,20 kr. uttan mvg.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera býartorgið í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin er kr. 2.399.664,00 kr. við mvg., um tikið verður av lægsta tilboðnum við sparingum. Her er veiting og montering av býartorgi, beinkir, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging v.m. íroknað.

2 mió. eru longu játtaðar av konto 6275 og 400.000,00 kr. við mvg. resta í, um tikið verður av samlaða kostnaðinum. Møguleiki er at fíggja 400.000,00 av konto 7510, bussleiðin.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum við sparingum hjá TG-Verk, at játta írestandi 400.000,00 kr. av konto 7510, bussleiðin, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

# 124/18 Gøtunavn til innkoyringarveg frá Glyvursvegi til "Undir Kongavarða" og "Við Klingrutjørn"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 30.10.2017 | 6/17 | 17/03498-2 |
| 2 Gøtunavnanevndin | 26.02.2018 | 1/18 | 17/03498-2 |
| 3 Gøtunavnanevndin | 30.04.2018 | 2/18 | 17/03498-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 175/18 | 17/03498-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 124/18 | 17/03498-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Umhvørvisstovan hevur sent áheitan til Teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu um at broyta gøtunavnið "Undir Kongavarða" soleiðis, at teinurin frá Glyvursvegi til "Undir Klingrutjørn" og víðari fær sítt egna navn. Vegurin er vístur við reyðum á hjáløgdu mynd.

**Gøtunavnanevndin 30. oktober 2017:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Sambært skrivi frá teknisku deild 20.02.2018 er í fyrsta umfari neyðugt at fáa eitt nýtt navn til innkoyringarvegin frá Glyvursvegi og niðan til nýggja býlingin "Við Klingrutjørn". Samstundis verður sagt frá, at Umhvørvisstovan viðmælir, at nýggja útstykkingin í framhaldi av vegnum fær sama veganavn.

**Gøtunavnanevndin 26. februar 2018:** Nevndin ynskir ein ástaðarfund og meira kunning um, um fleiri útstykkingar verða frá sama vegi og hvørjar ætlanir eru á økinum yvirhøvur.

**Ískoyti:**
Fundurin 30.04.2018 byrjar við ástaðarfundi, har nevndin fær kunning frá staðkendum argjamanni og einum starvsfólki á tekniska økinum hjá kommununi.

**Gøtunavnanevndin 30. apríl 2018:** Nevndin mælir til, at vegurin frá Glyvursvegi til endan á nýggju útstykkingini eisini fær navnið «Við Klingrutjørn».

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

| Býráðsfundur<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 437 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Marin Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 438<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 125/18 Dagføring av kloakk í Tróndargøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 28/18 | 18/01774-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 150/18 | 18/01774-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 125/18 | 18/01774-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við dagføring av kloakkum í Tórshavnar kommunu eru ætlanir at fara undir at dagføra kloakkirnar í Tróndargøtu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Staðfest er at kloakkirnar í Tróndargøtu eru í sera ringum standi og at íbúgvar í økinum hava trupulleikar av hesum.
Umsitingin hevur saman við ráðgeva kannað og skrásett kloakkirnar og kistuna frá Jóannesar Paturssonar gøtu til Bøgøtu.
Umsitingin saman við ráðgeva, hava gjørt prosjekt klárt til útbjóðing j.nr. 18/01774-2

Ynski er at fara í gongd við arbeiðið beinanvegin, og tí er prosjektið boðið út við treytum um góðkenning frá viðkomandi nevndum og býráði.

Tá tað er nógv handilsvirksemi í økinum, er átrokandi at fáa møguleikan at byrja beinanvegin, fyri at arbeiðið kann verða komið væl ávegis áðrenn ólavsøku og verða liðugt áðrenn jólasølan byrjar.
Treyt í útboði er, at grevstrararbeiðið verður gjørt í samráð við handilsfelagið í miðbýnum soleiðis, at tað órógvar virksemi í økinum sum minst.

Fíggjartørvur fyri verkætlanina er mettur til 2,6 mió. kr. j.nr. 18/01774-3

**Skjøl**
Útboðstilfar j.nr. 18/01774-2
Fíggjartørvur j.nr. 18/01774-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin, mæla til at:
- Játta 2,6 mió. kr. av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018, konto 6875.
- Taka av lægsta tilboðnum og seta arbeiðið í gongd.
- Beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

Annika Olsen boðaði frá, at hon er ógegnig og luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 126/18 Dagføring av kloakk í Bringsnagøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 29/18 | 18/01775-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 151/18 | 18/01775-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 126/18 | 18/01775-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við dagføring av kloakkum í Tórshavnar kommunu eru ætlanir at fara undir at dagføra kloakkirnar í Bringsnagøtu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Staðfest er at kloakkirnar í Bringsnagøtu krevja ábøtur og er ynski at fara undir at dagføra hesar. Arbeiðið er átrokandi, tá nógv matstovuvirksemi v.m. er í økinum.

Arbeiðið umfatar at
Dagføra kloakk- og nýggja regnvatnsleiðing.
Skráseta og staðfesta hvørjar ábøtur eru neyðugar.
Fáa ráðgeva at gera prosjekt klárt til útbjóðing.

Ynski er at farið verður undir at prosjektera beinanvegin og at arbeiðið verður boðið út at byrja í heyst.

Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið at gera prosjekt klárt til útbjóðing er mettur til kr. 280.000,-.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 280.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018, konto 6875, gera prosjekt klárt at bjóða út, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 442 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 127/18 Nýggj kloakk í Homrum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 30/18 | 18/01776-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 152/18 | 18/01776-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 127/18 | 18/01776-1 |

**Upprunin til málið:**
Sum partur av spillivatnsætlanini hjá Tórshavnar kommunu, at savna allar kloakkir í skipaðar leiðingar og út á streymasjógv og lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni í sambandi við spillivatnskunngerðina, hevur umsitingin saman við ráðgeva latið gera prosjekt klárt til útbjóðing j.nr. 18/01776-2.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Arbeiðið er partur av spillivatnsætlanini fyri Kollafjørð og er framhald av kloakkini Við Sjógv til Tornes og umfatar økið Í Homrum, Teinur IV. J.nr. 18/01776-2.
Prosjektið umfatar at savna allar kloakkir í økinum í skipaða leiðing, sum er leidd í verandi útleiðing á streymasjógv, Við Sjógv.

Umsitingin ynskir at fáa heimild at bjóða arbeiðið út, taka av lægsta tilboð og seta arbeiðið í gongd í vár.

Mettur fíggjartørvur fyri arbeiðið er 1,2 mió.kr. j.nr. 18/01776-3.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
18/01776-2 Útboðstilfar
18/01776-3 Fíggjartørvur

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| **Býráðsfundur**<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 443<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin, mæla til at:

- Játta 1,2 mió. kr. av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018, konto 6875.
- Bjóða arbeiðið út, taka av lægsta tilboðnum og seta arbeiðið í gongd.
- Beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

# 128/18 Serstøk byggisamtykt Villingadalsvegur matr. 1345a, 1346a og 1347

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 125/18 | 18/01810-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 128/18 | 18/01810-1 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt útstykking á matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a við Villingadalsvegin, Tórshavn. Av tí at tey flestu grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$ til støddar, skal serstøk byggisamtykt gerast.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Samlaða víddin á útstykkingini er uml. 29.000 $m^2$. Søkt er um at útstykkja 35 grundstykkir til stakhús, sum eru uml. 400-700 $m^2$ til støddar. Harumframt er fríøki, gøtusamband, felags p-pláss og reinsiverk.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað bústaðarbygging.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Útstykking - Villingadalsvegur matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a, Tórshavn, journal nr. 14/01474.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
18/01810-2 - Serstøk byggisamtykt
18/01810-3 - Yvirlitsplanur
18/01810-3 - Økið

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt við Villingadalsvegin og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

# 129/18 Skipan av økinum omanfyri Marknagilsvegin og undir Fjalli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 126/18 | 18/01811-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 145/18 | 18/01811-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 129/18 | 18/01811-1 |

**Upprunin til málið:**
Málið er byrjað sum framhald av málinum um keyp av lendi til bústaðarbygging, sum Sjálvsognarfelagið Kirkjubøarvegur hevur havt ynski um at keypa.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum felagið ynskti at keypa til bústaðarbygging, er ikki partur av eini størri heildarætlan, og er í løtuni ongin heildarætlan fyri økið og matriklarnar hjá kommununi í nærumhvørvinum.

Býurin veksur og byggilendini gerast færri í tali, tá hugsað verður um bygging innanfyri verandi bý. Tískil er eyðsætt at skipa alt økið, soleiðis at samanhangur verður ímillum bygging, vegasamband, atkomu, fríøki, parkering og virksemi í økinum. Her verður hugsað um alt økið og matriklarnar hjá kommununi omanfyri undir Gráasteini og niðan til byggingina "Mark", sí kortskjalið *Skipan av økinum_Marknagil* (reyða linjan á kortinum er vegleiðandi). Avmarkaða kortskjalið fevnir um matrikklarnar 1112, 1108, 1107, 1170, 1160a, 1160c, 1172a og 1176.

Avmarkaða økið liggur í umráðispørtunum A1 og A2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum í høvuðsheitum loyvir bústaðarbygging, bæði stakhúsum og íbúðum. Ein heildarætlan stuðlar undir visjónini í bústaðarpolitikkinum, at kommunan framhaldandi útvegar lendi til bústaðarbygging. Umframt bústaðarbygging er eisini møguligt at skipa økið til almennar stovnar, so sum ein møguligan dagstovn, røktarheim v.m.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði eru (brot úr almennu byggisamtyktini):

1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

   *Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

2. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum.*

3. *Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.*

4. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,3*

5. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 m2 ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m2 og 500 m2 verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.*

   *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði eru:

1. *Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.*

2. *Útstykking til tílíka bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt nattúrliga avmarkað øki.*

3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.*

4. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.*

5. *Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Áheitan vegna Sjálvsognarfelagið Kirkjubøarvegur um keyp av lendi av matr nr. 1160a, Tórshavn til sethúsabygging, journal nr. 16/03590

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar. Heildarætlanin verður gjørd í samráð við býarverkfrøðingin og teknisku deild.

**Skjøl**
Skipan av økinum_Marknagil, journal nr. 18/01811-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 448 |
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at umsitingin kann fara undir at skipa avmarkaða økið til bústaðarbygging og almennar stovnar v.m., at gera eina heildarætlan fyri økið, umframt at játta kr. 200.000 av kt. 6475 til skipan av økinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:**Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

# 130/18 Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 72/18 | 18/01311-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 93/18 | 18/01311-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 170/18 | 18/01311-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 85/18 | 18/01311-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 121/18 | 18/01311-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 130/18 | 18/01311-1 |

**Upprunin til málið:**
Fyrispurningar og skrivligar áheitanir um hvørjar reglur eru galdandi fyri tey vitjandi í kirkjugørðunum, serliga um viðurskifti við koyring og parkering av akførum inni í kirkjugarðinum.

Fleiri áheitanir frá leiðandi gravarum um skilaleysa koyring inni á kirkjugarðinum. Kærur frá vitjandi, sum ikki longur hava frítt at ganga inni í gørðunum.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Leingi hevur verið tørvur á at gera nakrar reglur fyri, hvussu tey vitjandi á kirkjugørðunum skulu fyrihalda seg.

Uppskot til reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu:

**Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu**

1. Kirkjugarðurin er vígdur friðarstaður, sum eingin má órógva.

2. Gingið eigur bert at verða á kirkjugarðsgøtunum, og har, sum ikki er grivið.

3. Smábørn eiga ikki at vera í kirkjugarðinum uttan við vaksnum, sum hava ábyrgdina av teimum. Børn mugu ikki spæla á kirkjugarðinum.

4. Fólk, sum vitja inni í kirkjugarðinum, skulu lata portur væl aftur eftir sær.

5. Hundar skulu ikki koma inn í kirkjugarðin og annar fenaður heldur ikki.

6. Á kirkjugarðsgøtum og vegum má eingin koyra, undantikið akfør hjá kommununi ella onnur, sum hava fingið serligt loyvi frá kirkjugarðsumsitingini (leiðandi gravara). Barnavognar og avlamistól undantikin.

7. Ikki er loyvt at arbeiða á kirkjugarðinum ella við gravir meðan jarðarferð er. Harumframt eisini sunnu- og halgidagar, og áðrenn sólarris og aftaná sólsetur yrkadagar. Um summarið ikki aftaná kl. 20.00.

8. At klúgva um girðingar ella hegn er ikki loyvt.

9. Garðar, hegn, stik, gróðursetingar, minnismerki, gravsteinar ella annað skal hava frið.

10. Nummarspjøldur við gravirnar eru ogn hjá kirkjugarðinum, og mugu tey hvørki flytast ella burturbeinast av teimum, ið eiga og røkja gravirnar.

11. Burturkast, gamlir kransar, lok og rusk skal koyrast í ruskíløtini.

12. Starvsfólk á kirkjugørðunum hava skyldu at gera vart við brot á hesar reglur og gravarfriðin sum heild á kirkjugørðunum.

13. Brot á reglurnar kann revsast við bót, umframt møguliga revsiábyrgd.

14. Býráðið kann broyta og Føroya Stiftsstjórn skal samtykkja, áðrenn broytingar verða settar í gildi.

*Tórshavnar kommuna, tann 1. mai 2018*

Samband
Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin
Gravaraskrivstovan í Vika 2

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Skipan av QR kotu um kortskipanina við gravum.

Gravaraskrivstovan og gravarin umsita og útinna, geva boð/loyvi og taka ímóti og svara kærum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fyrispurningur í máli nr. 18/00340 um viðurskifti við fráseting av bilum og parkering inni í kirkjugarðinum.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki

**Umhvørvisárin**
At tað verður minni luftdálking inni á kirkjugørðunum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Mentamálanevndin og staðbundnu nevndirnar skulu kunnast

**Skjøl**
Eingi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | x | | |

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at taka undir við uppskotinum um reglugerð, at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina og staðbundnu nevndirnar til kunningar og viðmerkingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at seinna helvt av pkt. 3 «Børn mugu ikki spæla á kirkjugarðinum» verður tikið úr reglugerðini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Hallu Samuelsen um at beina málið aftur í nevnd.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Eftir fundin í byggi- og býarskipanarnevndini tann 12. apríl og býráðnum tann 24. apríl, hevur umsitingin gjørt nakrar smávegis broytingar í punktunum 3 og 7, og er uppskotið til reglugerðina soljóðandi:

**Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu**

1. Kirkjugarðurin er vígdur friðarstaður, sum eingin má órógva.

2. Gingið eigur bert at verða á kirkjugarðsgøtunum, og har, sum ikki er grivið.

3. Smábørn eiga ikki at vera í kirkjugarðinum uttan við vaksnum, sum hava ábyrgdina av teimum.

4. Fólk, sum vitja inni í kirkjugarðinum, skulu lata portur væl aftur eftir sær.

5. Hundar skulu ikki koma inn í kirkjugarðin og annar fenaður heldur ikki.

6. Á kirkjugarðsgøtum og vegum má eingin koyra, undantikið akfør hjá kommununi ella onnur, sum hava fingið serligt loyvi frá kirkjugarðsumsitingini (leiðandi gravara). Barnavognar og avlamistól/bilar undantikin.

7. Ikki er loyvt at arbeiða á kirkjugarðinum, útyvir vanliga røkt av gravstøðum, meðan jarðarferð er, umframt sunnu- og halgidagar, áðrenn sólarris og aftaná sólsetur yrkadagar og um summarið ikki aftaná kl. 20.00.

8. At klúgva um girðingar ella hegn er ikki loyvt.

9. Garðar, hegn, stik, gróðursetingar, minnismerki, gravsteinar ella annað skal hava frið.

10. Nummarspjøldur við gravirnar eru ogn hjá kirkjugarðinum, og mugu tey hvørki flytast ella burturbeinast av teimum, ið eiga og røkja gravirnar.

11. Burturkast, gamlir kransar, lok og rusk skal koyrast í ruskíløtini.

12. Starvsfólk á kirkjugørðunum hava skyldu at gera vart við brot á hesar reglur og gravarfriðin sum heild á kirkjugørðunum.

13. Brot á reglurnar kann revsast við bót, umframt møguliga revsiábyrgd.

14. Býráðið kann broyta og Føroya Stiftsstjórn skal samtykkja, áðrenn broytingar verða settar í gildi.

*Tórshavnar kommuna, tann 1. mai 2018*

Samband
Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin
Gravaraskrivstovan í Vika 2

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at taka undir við uppskotinum um reglugerð og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina og staðbundnu nevndirnar til kunningar og viðmerkingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Nevndin samtykti at taka undir við reglugerðini, við hesuum broytingum:
pkt. 3: skal burtur
pkt. 5: hundar skulu ikki ganga leysir og annar fenaður skal ikki verða í kirkjugarðinum
pkt. 13: skal burtur

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Ein meiriluti Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við teimum broytingum sum byggi- og býarskipanarnevndin samtykti og beina málið í býráðið.

Ein minniluti Heðin Mortensen stemmar blankt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Mentamálanevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, einari ímóti og 4 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Tráin P. Nónklett, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Annfinn Brekkstein.

# 131/18 Nýggj læknamiðstøð í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 131/18 | 18/01941-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin ynskja at fáa mál um Læknamiðstøð í Gundadali á skrá til fyrstkomandi býráðsfund.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Minnilutin í býráðnum, Sambandsflokkurin og Javnarflokkurin mæla til, at bygd verður nýggj læknamiðstøð á egnum matrikkli í Gundadali - matr.nr. 1292n ella øðrum stykki hjá kommununi t.d., Hoyvík.

Nú meirilutin arbeiðir við at kanna møguleikan við at leiga og umbyggja Smyrilsveg 20 hjá P/F TF Holdingsamtakinum til 6 læknar at húsast í, mælir minnilutin til, at hendan verkætlan verður slept, og nýggj læknamiðstøð verður bygd ístaðin.

Vit mæla býráðnum til, at nýggja læknamiðstøðin verður meinlík henni , sum er í Gundadali í dag, har Jenis av Rana og aðrir læknar húsast

Vit havi fingið kunnleika um, at umbyggingin á Smyrilsvegi 20, kann koma at kosta uml. 30 mió.kr., og tað er óvist, hvussu nógv eigararnir koma at bera av umvælingarkostnaðinum.

Um vit binda okkum til leigausáttmálan í 15 ár - kemur tað at kosta uml. 42 mió.kr. + umvælingina. Hvat okkara partur verður av umvælingini vita vit týsdagin, tá fundur verður millum býráðið og Betri samtakið um omanfyristandandi.
Vit eru eisini kunnaði um, at umbygdu hølini í Miðlon, sum kommunan leigar í dag, ikki eru optimal, tey kundu verið betri. Tað ljóðar, at tað hoyrist ímillum viðtaluhølini og tað er ikki nøktandi fyri læknarnar, sum arbeiða har.

Lat okkum tí ikki endurtaka sama feil, nevnliga at leiga og umbyggja eina ogn, sum vit ikki eiga og ikki er bygd til endamálið.

Um vit byggja eina læknamiðstøð líknandi henni í Gundadali, men 1500 m2 til 6 læknar á matr. 1292n., so fáa vit ein nýggjan bygning, sum er bygdur til endamálið.

Tað er okkum upplýst, at man kann rokna við einum fermetraprísi á uml. 20.000 kr. við øllum, undantikið innbúgv. Men hettar er vegleiðandi, men á góðari leið.

Matr.nr. 1292n liggur á Oknarvegi og er ogn hjá Tórshavnar Kommunu.
Vit hava brúk fyri læknum og tað er umráðandi, at teirra arbeiðsumstøður og hølisviðurskifti eru av teimun bestu. Tí mæla vit til at byggja nýggj læknahøli.

Vegna Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin
Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø,Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen

**Lógir, ásetingar o.a.**

| | Býráðsfundur<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 454<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Annfinn Brekkstein, Helenu Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Hallu Samuelsen og Heðini Mortensen, um at beina málið í trivnaðarnevndina, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helenu Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Heðini Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Tráin P. Nónklett, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani var atkvøtt um uppskot frá Heðin Mortensen um at beina málið í fíggjarnevndina, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Tráin P. Nónklett, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðan varð atkvøtt um uppskot frá borgarstjóranum um at enda orðaskiftið, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Tráin P. Nónklett, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein

# 132/18 Framflytingar fyri árið 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 123/18 | 18/01521-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 97/18 | 18/01521-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 132/18 | 18/01521-1 |

**Upprunin til málið:**
Mannagongdin hjá Tórshavnar kommunu er, at ikki nýttar játtanir verða fluttar til komandi ár. Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. Í sambandi við at roknskapurin fyri 2017 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2018. Samlaða framflytingin fyri rakstur er 5,4 mió. kr. netto og ikki nýttar íløgujáttanir at flyta fram eru 322,9 mió. kr.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Kommunustjórin, Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting 5,4 mió. kr. netto, til rakstur og 78,9 mió.kr. til íløgur.

Fyri Tórshavnar Havn mæla kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin harumframt til at flyta fram 244,0 til íløgur.

Stjórnin mælir til fylgjandi broytingar í framflytingum:

| | Flytast á: | | | Fíggjast av: | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Navn** | **Upphædd** | **Deild** | **Navn** | **Upphædd** |
| **§1** | | | | | |
| 1313 | Tekniska fyrisitingin | **1.000** | 6111 | Leiga traðir og økir | **1000** |
| **§2** | | | | | |
| 2210 | Kommunulæknatænnastur | **406** | 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | **406** |
| 2721 | Røktartænastur | **5.623** | 2720 | Heilsuhúsið | **2436** |
| | | | 2722 | Tilboð | **1836** |
| | | | 2730 | Fyrisiting | **59** |
| | | | 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | **756** |
| | | | 2750 | Ansingarsamsýning | **536** |
| **§3** | | | | | |
| 3213 | Systkinaavsláttur | **431** | 3216 | Verkætlanir á ungdómsøkinum | **431** |
| **§4** | | | | | |
| 4126 | Forskúli til Lítlaskúla | **23** | 3144 | Frítíðarskúli til Lítlaskúla | **23** |
| **§5** | | | | | |
| 5716 | Skoytubreyt | **148** | 5710 | Uttandura vallir | **148** |
| 5717 | Ítróttaranlegg | **201** | 5710 | Uttandura vallir | **201** |
| **§6** | | | | | |
| 6510 | Kirkjugarðar | **422** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **422** |
| 6611 | Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk | **237** | 6610 | Umhvørvistiltøk o.a. | **237** |
| 6810 | Kloakkir o.a. | **216** | 6811 | Áir, yvirflatuvatn og veitir | **216** |
| 8111 | Reinhald | **257** | 6610 | Umhvørvistiltøk o.a. | **257** |
| 8113 | Ferðsla | **159** | 6211 | Aðrar útreiðslur fríðkan | **159** |
| 8114 | Kavarudding | **1.000** | 8110 | Vegir o.a. | **600** |
| 8114 | Kavarudding | | 6811 | Áir, yvirflatuvatn og veitir | **400** |
| **§7** | | | | | |
| 7110 | Renovatión | **1.000** | 7510 | Bussleiðin ella meirinntøkur | **1.000** |

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, sum eykajáttan, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 459 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 133/18 Eykajáttan 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 124/18 | 18/01522-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 131/18 | 18/01522-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 98/18 | 18/01522-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 133/18 | 18/01522-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Málslýsing:**
Tøkur peningur í Tórshavnar kommunu var við ársskifti 231 mió. kr. Tilráðingin er, at kommunan hevur eitt minsta gjaldførið á 80 mió. kr. Orsøkin til økta gjaldføri eru fleiri. Í ársroknskapinum 2017 kann staðfestast, at skattainntøkurnar eru hægri enn mett í fíggjarætlanini. Játtan at flyta fram er fyri løgur 78 mió. kr. og fyri rakstur 5,4 mió. kr. 50 mió. kr. av innistandandi eru ætlaðar at fíggja íløgur í 2018. Mett verður eisini at kommunan fær inntøku vegna sølu av grundøkjum í árinum. Tøkur peningur, tá árið er gjørt upp er mettur at verða 29,3 mió. kr. sum kunnu ráðast yvir. Fleiri rakstrarstøð eru við manglandi fígging og kann tøkið peningurin nýtast til fígging av hesum.

**Tænastumannaeftirlønir**
Játtanin fer til eftirlønir hjá fyrrverandi borgarstjórum og tænastamanna settum starvsfólkum. Um viðkomandi er deyður, til avvarðandi teirra, sum tá sambært lóg hava rætt til eftirløn. Fleiri fólk enn ætlað í fíggjarætlanini hava fingið tænastamannaeftirløn. Játtanin var 3 mió. kr., útgoldið var 3,5 mió. kr.

**Naina**
Sambært løgtingslóg nr. 18 frá 9. apríl 1964 um raksturin av Hvíldarheiminum Naina rindar kommunan tann partin av rakstrinum, sum ikki verður goldin við játtan á fíggjarløgtingslógini og av Heilsutrygd, í mun til dagarnar, íbúgvar í kommununi hava verið á heiminum.

Kontan hevur haft hall síðani 2014. Játtanin hevur verið í millum 1,6 og 1,9 mió. kr. um árið, meðan raksturin hevur verið í millum 2 og 2,3 mió. kr. Játtanin til Hvíldarheimið Naina er 2018 2 mió. kr.

**NSR**
Játtanin var til útreiðslur til Námsfrøðiliga Sálarfrøðiliga Ráðgeving (Sernám). Málsøkið var burturav landsins, men av tí at mett var, at tað var eitt framstig fyri tænastustigið, játtaði kommunan at gjalda fyri vanligan skrivstovurakstur og løn til ein skrivara. Mentamálaráðið yvirtók allar rakstrarútreiðslur pr. 1. januar 2015, síðani hevur rakstrarstaði ikki haft nakra játtan og stavar hallið frá 2014.

**Renovatión**
Kommunala Brennistøðin hevur til endamáls at røkja kommununnar uppgávur og skyldur í sambandi við burturkast. Meirnýtslan í 2017 stavar í høvuðsheitum frá eldsbruna í ruskgoymsluni, og viðførdi skaða á bygning, herundir vindeygu, hurðar og el-installatiónir, umframt at kranin gjørdist vrak. Um eykajáttan ikki verður givin fer tað at ganga út yvir virksemi á brennistøðini í 2018.

**Lønarbroytingar**
Lagt var upp fyri eini lønarhækkan á 2% í fíggjarætlanini fyri 2018. Gongdin í sáttmálasamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum, fyri sáttmálar sum gingu út 30/9-2017, hevur á nøkrum økjum viðført umfatandi lønarhækkingar. Ramman hevur verið 2,3% fyrra árið og 2,5% seinna árið. Útgangsstøði var at man skuldi samráðast í krónum og í nøkrum samráðingum er man farin burtur frá hesum til at samráðast um prosentir.

Avleiðingin er at lønarhækkanin fyri lægri lønir er hægri í prosentum, enn fyri tær hægru lønirnar. Tórshavnar kommuna hevur nógv starvsfólk í lægra lønarbólkinum.
Nýggi sáttmálin millum Fíggjamálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar viðførdi stórar broytingar, bæði strukturelt og ein høga lønarhækkan hjá landinum. Samráðingarnar á kommunala økinum eru lidnar og liggja lønarbroytingarnar á einum væl hægri støði enn tikið var hædd fyri í fíggjarætlanini.
Lønarhækkanin er sera ymisk fyri tey ymisku feløgini. Út frá teimum sáttmálum sum eru undirskrivaðir og frá innanhýsis tølum er greitt, at lønarhækkanin fer at vera væl meira enn 2% og væl meira enn ramman var upprunaliga. Mælt verður tí til at leggja upp fyri lønar broytingum við 5 mió. kr.

**Læknahøli**
Játtanin er til útreiðslur sambært løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulækna skipan við seinni broytingum. Sambært lógini er tað ábyrgd kommununnar at útvega og rinda viðtaluhøli við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknarnar og bera útreiðslurnar av rakstri og viðlíkahaldi. Eisini skal kommunan útvega frían bústað til frítíðar- og langtíðaravloysarar.

Heilsumálaráðið hevur fráboðað kommununi, at tveir nýggir læknar eru normeraðir til Tórshavnar kommunu at seta skjótast gjørligt. Kommunan skal í hesum sambandi fáa til vega nýggj læknaviðtaluhøli. Neyðugur peningur er ikki settur av til endamálið í fíggjarætlanini fyri 2018.

**Ansingarpláss**
Játtanin er til vantandi ansingarpláss í kommununi uml. 46 vøggustovu- og 17 barnagarðspláss. Harafturat er neyðugt at fíggja 3 mió. kr. við sparingini orsakað av verkfallinum.

**Løgur barnaansing**
Játtanin skal brúkast til at fáa fleiri dagstovnapláss, harundir tillagingarnar av realskúlanum.

**Aðrar útreiðslur**
Hendan konta er til óvæntaðar inntøkur og útreiðslur. Kontan hevði eitt hall á 704 t.kr. Játtanin til aðrar útreiðslur í 2018 er sostatt við framfluttum 1,75 mió. kr.  2,8 mió. kr. er játtaðar til serstaka viku fyri tímalønt. Í árinum væntast harumframt øktar útreiðslur til løgfrøðiligar tænastur m.a. í sambandi við fleiri byggimál.

**Karlamagnusarbreyt**
Neyðugt er at bøta um viðurskiftini á Karlamagnusarbreyt. Sambært skeytinum hevur kommunan ymiskar skyldur. 3,7 mió. kr. eru ætlaðar asfaltering af felagsøkjunum sambært skjeytum, ferðslutrygdarviðurskiftir, parkeringspláss og annað.  Neyðugt verður eisini at peningur verður settur av til endamálið á fíggjarætlanini í 2019.

**Byggi- og umhvørvisdeildin**
Talið av starvsfólkum á byggideildini hevur verið tað sama í nógv ár. Í januar 2017 kom nýggj bygningskunngerð (BK17), sum krevur nógv meira av byggimálsviðgerðini enn áður, eisini er øll brunateknisk málsviðgerð flutt til kommunurnar at umsita.

Hesi seinastu árini er talið av byggimálum, fyrispurningar og øðrum nógv vaksið. Í 2015 var talið av givnum byggiloyvum uml. 200 og seinastu 2 árini hevur hetta talið verið uml. 300, sum er ein øking uppá uml. 40%.

Skal kommunan framhaldandi kunna bjóða eina góða og skjóta tænastu til okkara borgarar, so er neyðugt at seta fleiri starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini.

**Talgildu Føroyar**
Løgtingið hevur samtykt verklagslógina um Talgildu Føroyar. Við lógini verður mett at vit fáa eitt betri og virkisførari Føroyar. Landið hevur sett 90 mió.kr. til endamálið næstu árini og ynskir í hesum sambandi eitt samstarv við m.a. kommunurnar.

Samlaða fíggjarætlanin fyri verkætlanina er 150 mió. kr. Harav er býtið millum týðandi áhugapartarnar ætlað soleiðis : landi 60 %, kommunur 17% og sponsorar 23% Lagt er upp til, at allar kommunur rinda lutfalsliga, tað vil siga eftir fólkatali. Fyri Tórshavnar kommunu merkir hettar eitt árligt gjald á uml. 3,5 mió. kr. næstu 3 árini.

**Fyribyrgjandi verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið**
Játtaðar verða kr. 1 mió til kontu 2460 stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið. Sambært nýggjum leiðreglum fyri kontuna er endamálið við játtanini at stuðla undir fyribyrgjandi og heilsumennandi verkætlanum, tiltøkum, átøkum og tilboðum innan almanna- og heilsuøkið, sum kunnu vera borgarum og virkisøkjum kommununnar til gagns bæði í stutttíðar- og langtíðarhøpi.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til, at tøki peningurin verður nýttur til at fíggja niðanfyri standandi rakstrarstøð við manglandi fígging soleiðis:

| | |
|---|---:|
| Tænastumannaeftirlønir | 546.000 |
| Naina | 1.516.000 |
| NSR | 197.000 |
| Renovatión | 1.700.000 |
| Lønarbroytingar | 5.000.000 |
| Læknahøli | 3.000.000 |
| Ansingarpláss | 2.000.000 |
| Løgur barnaansing | 2.000.000 |
| Aðrar útreiðslur | 4.841.000 |
| Karlamagnussarbreyt | 3.700.000 |
| Byggi- og umhvørvisdeildin | 300.000 |
| Talgildu Føroyar | 3.500.000 |
| Fyribyrgjandi verkætlanir | 1.000.000 |
| | 29.300.000 |

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um eykajáttan og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

| | Blað nr.: 463 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. mai 2018 | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

# 134/18 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 60/18 | 18/00018-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 45/18 | 18/00018-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 87/18 | 18/00018-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 125/18 | 18/00018-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 99/18 | 18/00018-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 158/18 | 18/00018-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 134/18 | 18/00018-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. mai 2018 | Blað nr.: 465<br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Ískoyti:** Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Framlagt og góðkent

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapur fyri februar og mars verður lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mai 2018**: Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Tráin P. Nónklett | Jógvan Arge | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |